| | Býráðsfundur<br>27. mars 2025 | Blað nr.: 166<br><br>Forkvinnunnar merki: |
|---|---|---|

# GERÐABÓK

**Dato:** 27. mars 2025 **Kl**. 16:00
**Stað:** Býráðssalurin
**Málsnr: 67/25 – 92/25**

**FUNDARLEIÐARI:**
Elsa Berg

---

**VIÐ LUTTØKU AV:**
Heðin Mortensen
Heidi Lava Elgeirsdóttir
Annita á Fríðriksmørk
Anja Weyhe
Kristianna Winther Poulsen
Bergur Robert Dam Jensen
Guttormur í Skála
Tróndur Sigurðsson
Kári Johansen
Høgni Vilhelmsen
Birgir Nielsen
Sunnvá Dahl Høgfeldt

**LUTTÓKU EISINI:**
Eyðfríð Jacobsen
Eyðna Justinussen
Fríður Dalsgarð
Hermann Mortensen
Mortan Simonsen
David Andresen

**LUTTÓKU IKKI:**

**SKRIVARI:**
Jóan Petur Hentze

**PROTOKOLLFØRARI:**
Anna Havmand og Magnus Dam

**Innihaldsyvirlit** **Síða**

**Til viðgerðar**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 67/25 | 25/04253-1 | Annfinn Brekkstein berst frá at møta á býráðsfundi 27. mars 2025 | 169 |
| 68/25 | 25/00163-1 | Mál beind í nevndir 2025 | 170 |
| 69/25 | 25/03486-5 | Leigusáttmáli við Landssjúkrahúsið um grundøki til pumpuhús í Álakeri | 172 |
| 70/25 | 25/03196-3 | Faroe Ship ynskir at selja skrivstovuna á Eystaru bryggju - 22/00477 | 174 |
| 71/25 | 25/04022-1 | Arctic Mayors´ Forum | 176 |
| 72/25 | 25/03320-4 | Nevndarlimur Visit Tórshavn 2025 | 178 |
| 73/25 | 25/04040-1 | Umsókn um keyp av lendi burtur av matr. nr. 726c, Tórshavn - 24/08793 | 180 |
| 74/25 | 25/03413-2 | Lendi til Kirkjugarðin í Hoyvík. Búnaðarstovan hevur sent kommununi eina eykarokning, vegna keyp og avgreiðslu av lendi til kirkjugarðin. | 182 |
| 75/25 | 25/03914-4 | Møguligt keyp av matr.nr. 370 Tórshavn. Kondittaríið. Niels Finsensgøta 11, Tórshavn. | 184 |
| 76/25 | 25/04135-1 | Skipa serstaka nevnd | 186 |
| 77/25 | 25/00269-1 | Val av einum limi og tiltakslimi í SEV-nevndina - 24/08894 | 188 |
| 78/25 | 25/02482-3 | Eldrapolitikkur | 189 |
| 79/25 | 25/03568-1 | Nýtt skiftingarrúm í Virknishøllini í Finsen | 192 |
| 80/25 | 25/02736-1 | Oyggjaleikir 2027 - Fígging | 194 |
| 81/25 | 25/00533-2 | Føroya Sjósavn : Umsókn um at leingja játtanina og fáa part úgoldið til projektering | 197 |
| 82/25 | 25/01683-1 | Nýtt røktarheim og við røktaríbúðum | 200 |
| 83/25 | 25/03681-1 | Arkitekturpolitikkur fyri Tórshavnar kommunu - 22/05054 | 205 |
| 84/25 | 25/03741-1 | Gøtan fram við Sandá | 209 |
| 85/25 | 25/00581-2 | Útstykking til sethús við Stórutjørn - 22/02943 | 211 |
| 86/25 | 25/02841-1 | Orkuátøk á Lágargarði | 215 |
| 87/25 | 25/03368-1 | Dagføring av burturkastgjøldum 2025 | 218 |
| 88/25 | 25/03502-1 | Gjaldskipan til bussleiðina | 220 |
| 89/25 | 25/03985-1 | Framflytingar fyri roknskaparárið 2024 | 224 |

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>27. mars 2025 | Blað nr.: 168 |
| | Forkvinnunnar merki: |


| | | | |
|---|---|---|---|
| 90/25 | 25/00161-1 | Góðkenning av mánaðarroknskapinum 2025 | 226 |
| 91/25 | 25/00217-1 | Val av bygginevnd fyri nýtt røktarheim og við røktaríbúðum | 228 |
| 92/25 | 25/00153-1 | Nýtt felagshús til FC Hoyvík og heildarætlan fyri økið - 23/05602 | 229 |

**Til viðgerðar**

## 67/25 Annfinn Brekkstein berst frá at møta á býráðsfundi 27. mars 2025

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 27.03.2025 | 67/25 | 25/04253-1 |

**Málslýsing**
Annfinn Brekkstein hevur boðað frá, at honum berst frá at møta til býráðsfundin.

Sambært § 18, stk. 3, í kommunustýrislógini ger býráðið av, at treytirnar fyri innkallan av tiltakslimi, ið er Sunnvá Dahl Høgfeldt, eru loknar.

**Býráðsfundur 27. mars 2025:** Tikið til eftirtektar.

# 68/25 Mál beind í nevndir 2025

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 30.01.2025 | 34/25 | 25/00163-1 |
| 2 Býráðsfundur | 27.02.2025 | 49/25 | 25/00163-1 |
| 3 Býráðsfundur | 27.03.2025 | 68/25 | 25/00163-1 |

**Upprunin til málið**

**Lýsing av málinum**

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Tilmæli:**

**Býráðsfundur 30. januar 2025:** Tikið til eftirtektar.

**Býráðsfundur 27. februar 2025:** Tikið til eftirtektar.

**Býráðsfundur 27. mars 2025:** Tikið til eftirtektar.

| | Býráðsfundur<br>27. mars 2025 | Blað nr.: 172<br><br>Forkvinnunnar merki: |
|---|---|---|

# 69/25 Leigusáttmáli við Landssjúkrahúsið um grundøki til pumpuhús í Álakeri

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Havnanevndin | 11.03.2025 | 12/25 | 25/03486-5 |
| 2 Fíggjarnevndin | 19.03.2025 | 51/25 | 25/03486-5 |
| 3 Býráðsfundur | 27.03.2025 | 69/25 | 25/03486-5 |

**Upprunin til málið**
Umsókn frá Landsverk vegna Landssjúkrahúsið.

**Lýsing av málinum**
Tá ið fyrireikingarnar til bátahylin í Álakeri vórðu í gongd, spurdi Landsverk vegna Landssjúkrahúsið um at fáa avsett eitt øki við bátahylin til eina pumpustøð til sjóhita til nýggja H-bygningin, sum tá eisini stóð í gerð.
Pumpustøðin er bygd á økið, sum tá varð ávíst av Tórshavnar havn.
Landsverk søkir nú vegna Landssjúkrahúsið um at fáa viðurskiftini um grundøkið formliga skipað við einum langtíðar leigusáttmála.

Tórshavnar havn hevur gjørt uppskot til 25 ára leigusáttmála við Landssjúkrahúsið um grundøkið til pumpustøð.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**
J.nr. 25/03486-4 : Uppskot til Leigusáttmála.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☒ Nei

**Tilmæli:**
Stjórin í Tórshavnar havn mælir til at taka undir við uppskoti til leigusáttmála, j.nr. 25/03486-4, og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Havnanevndin 11. mars 2025**: Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 19. mars 2025:** Samtykt at taka undir við havnanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 27. mars 2025:** Einmælt samtykt.

| | | |
|---|---|---|
| | **Býráðsfundur**<br>27. mars 2025 | Blað nr.: 174 |
| | | Forkvinnunnar merki: |

# 70/25 Faroe Ship ynskir at selja skrivstovuna á Eystaru bryggju - 22/00477

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Havnanevndin | 11.03.2025 | 13/25 | 25/03196-3 |
| 2 Fíggjarnevndin | 19.03.2025 | 52/25 | 25/03196-3 |
| 3 Býráðsfundur | 27.03.2025 | 70/25 | 25/03196-3 |

**Upprunin til málið**
Keyp av skrivstovubygningi hjá Faroe Ship á Eystaru Bryggju

**Lýsing av málinum**
Víst verður til málslýsing og samtyktir í máli 22/00477.

Keypið er nú avgreitt og bygningurin er yvirtikin av Tórshavnar havn tann 15/10-2024. GlobeTracker leigar 3 tær niðastu hæddirnar.

Umframt keypskostnaðin á 12 mió eru kr. 121.000 fyri tinglýsingarútreiðslur bókaðar aftrat á verkætlanarkontuna. Neyðugt er tí at játta kr 121.000 aftrat av løgukarminum hjá Tórshavnar havn fyri 2025, til verkæltanina P45 “Keyp av skrivstovubygningi”. Upphæddin er avsett á Íløguætlanini hjá Tórshavnar havn fyri 2025.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**
J.nr 25/03196-2 : Málslýsing og samtykt mál 22/00477.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Tilmæli:** Stjórin í Tórshavnar havn mælir til, at játtaðar verða kr. 121.000 av løgukarminum hjá Tórshavnar havn fyri 2025 til verkætlan P45 “Keyp av skrivstovubygningi”; at loka málið/verkætlanina; og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Havnanevndin 11. mars 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 19. mars 2025:** Samtykt at taka undir við havnanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 27. mars 2025:** Einmælt samtykt.

# 71/25 Arctic Mayors´ Forum

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 19.03.2025 | 56/25 | 25/04022-1 |
| 2 Býráðsfundur | 27.03.2025 | 71/25 | 25/04022-1 |

**Upprunin til málið**
Borgarstjórin ynskir at taka upp aftur samstarvið við Arctic Mayors´ Forum og at gerast formliga limur í Arktiska felagsskapin.

**Lýsing av málinum**
Arctic Mayors´ Forum (AMF) er ein felagsskapur, hvør endamál er at geva lokalu stjórnunum í Arktis ein leiklut í menningin i av Arktiska økinum, sum í løtuni hevur ein vaksandi áhuga millum fleiri av heimsins stórveldum. AMF varð formelt stovnað í 2019, tá umboð frá 11 kommunum skrivaðu undir stovningarskjal – ein av stovnandi limunum var Tórshavnar kommuna. Í 2024 vóru 19 limir í AMF. Samtykt varð á Býráðsfundi 16. desember 2021 at steðga hesum samstarvinum.

Høvuðsskrivstovan hjá AMF er staðsett í Tromsø í Noregi og hevur hon eitt fólk í fulltíðarstarvi umframt eitt fólk parttíð. Felagsskapurin er við í fleiri ES verkætlanum, sum snúgva seg um at menna arktiska øki á burðardyggan hátt, og í samsvari við ynskjunum hjá borgarunum.

Í 2023 avgjørdi AMF at heilsa og trivnaður hjá borgarum í Arktis skuldi raðfestast í virkseminum fram móti 2027 og at arktiski ungdómurin hevur ein berandi leiklut.

Umsitingin hevur verið í sambandi við avgreiðslustovuna hjá AMF og sambært henni, kann Tórshavnar kommuna gerast formliga limur beinanvegin. Árliga gjaldið fyri limaskap verður ásett eftir talið á borgarum í kommununum. Limagjaldið hjá Tórshavnar kommunu er sambært hesum 3000 evrur – umleið 22.500 kr. – árliga. Afturat limagjaldinum er væntað, at kommunan luttekur aktivt í arbeiðinum hjá AMF og væntandi verður onkur uttanlandaferð hjá borgarstjóranum og øðrum umboðum frá kommununi.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
18/04082: Kunning um Arctic Mayors´ Forum

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>27. mars 2025 | Blað nr.: 177 |
| | Forkvinnunnar merki: |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei
**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

## Játtan:

Vanlig játtan ☒
Eyka játtan ☐
Lokað verkætlan ☐

| Játtast av: | | |
|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** |
| 1110 | | |

| Játtast á: | | | |
|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** |
| | | | |

| **Upphædd** |
|---|
| |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | 22.500 |

**Tilmæli:** Kommunustjórin mælir til, at Tórshavnar kommuna tekur samstarvið við Arctic Mayors´ Forum uppaftur og limar seg formliga inn í felagsskapin.

**Fíggjarnevndin 19. mars 2025:** Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson og Høgni Vilhelmsen, tekur ikki undir við tilmælinum og krevur málið lagt fyri býráðið.

Ein minniluti, Kristianna Winther Poulsen og Guttormur í Skála, tekur undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 27. mars 2025:** Atkvøtt varð um tilmælið til fíggjarnevndina, ið varð samtykt við átta atkvøðum fyri, fýra atkvøðum ímóti og einari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Kristianna Winther Poulsen, Bergur Robert Dam Jensen, Guttormur í Skála og Sunnvá Dahl Høgfeldt.

Ímóti atkvøddu: Tróndur Sigurðsson, Kári Johansen, Høgni Vilhelmsen, Birgir Nielsen.

Blankt atkvøddi: Heðin Mortensen.

## 72/25 Nevndarlimur Visit Tórshavn 2025

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 27.03.2025 | 72/25 | 25/03320-4 |

**Upprunin til málið**

Býraðið skal velja ein nevndarlim og ein tiltakslim í nevndina fyri Felagið Tórshavn, sum hevur kallað inn til aðalfund tann 23. apríl 2025. Nevndarlimur Eirik Suni Danielsen og tiltakslimur Rókur Tummasarson standa fyri vali.

Umframt val av føstum limi og varalim fyri hendan, skal nýggjur varalimur veljast fyri Annitu á Fríðríksmørk, sum nú er nývald í Tórshavnar býrað.

**Lýsing av málinum**

Nevndin hjá Felagnum Tórshavn telur fimm limir, sum sita tvey ár í senn. Annaðhvørt ár standa tveir nevndarlimir fyri vali, og annaðhvørt ár standa tríggir limir fyri vali.

Tveir nevndarlimir verða valdir beinleiðis av Tórshavnar kommunu og tríggir verða valdir av Felagnum Tórshavn á aðalfundi. Teir nevndarlimirnir, ið Tórshavnar kommuna velur, og tveir av nevndarlimunum, ið Felagið Tórshavn velur, skulu vera persónar, sum eru leiðarar ella stjórar innan ferðavinnu, handilsvinnu, matstovu vinnu og møguliga aðra vinnu, sum hevur ein viðkomandi leiklut í ferðavinnu høpi. 3. nevndarlimurin, sum Felagið Tórshavn velur, umboðar Felagið Tórshavn, og kann verða valdir millum limir felagsins ella umboðandi almennan ella privatan stovn, savn, mentanarlív ella líknandi.

Nevndarlimir kunnu ikki vera býráðslimir. Nevndarlimir kunnu verða valdir aftur. Fyri hvønn nevndarlim verður tiltaksnevndarlimur valdur. Nevndin skipar seg sjálva við formanni og næstformanni.

Andstøðan valdi í 2024 nevndarlim og tiltakslim. Í 2025 er tað samgongan, sum skal velja lim og varalim.

Hesi sita í nevndini í dag:

1. Henny á Líknargøtu, Smyril Line – Forkvinna
2. John Mikkelsen, Gist og Vist
3. Herleif Hammer, Tjóðsavnið
4. Sóley Heradóttir Hammer, Hugskotið/Tórshavnar Kommuna
5. Eirik Suni Danielsen, Tórshavnar Kommuna

Tiltakslimir:

1. Oddfríð Petersen, Smyril Line
2. Petrine Nólsoy Larsen
3. Helgi Dahl Michelsen Tjóðsavnið
4. Annita á Fríðriksmørk, vegna Tórshavnar Kommunu
5. Rókur Tummasarson, vegna Tórshavnar Kommunu

Í ár standa Eirik Suni Danielsen og Rókur Tummasarson fyri vali sum umboð fyri Tórshavnar kommunu. Eisini skal nýggjur varalimur veljast fyri Annitu á Fríðriksmørk, ið er býráðslimur.

**Lógir, ásetingar o.a.**

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>27. mars 2025 | Blað nr.: 179<br><br>Forkvinnunnar merki: |

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☒ Nei

**Tilmæli:** Deildarleiðarin á Stjórnarskrivstovuni og kommunustjórin mæla til, at Býráðið velur lim og tveir varalimir í nevndina fyri Felagið Tórshavn.

**Býráðsfundur 27. mars 2025:** Einmælt samtykt at velja Eirik Suna Danielsen sum nevndarlim og Rók Tummasarson og Sunnvá Dahl Høgfeldt sum varalimir.

# 73/25 Umsókn um keyp av lendi burtur av matr. nr. 726c, Tórshavn - 24/08793

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 19.03.2025 | 53/25 | 25/04040-1 |
| 2 Býráðsfundur | 27.03.2025 | 73/25 | 25/04040-1 |

**Upprunin til málið**
Umsókn frá eigaranum av matr. nr. 726l, Tórshavn, um at keypa lendi burtur av grannaognini matr. nr. 726c, Tórshavn, ið Tórshavnar kommuna eigur.

**Lýsing av málinum**
Eigarin av matr. nr. 726l søkir í umsókn dagfest 10. september 2024 um at keypa ein geira á uml. 2x12 metrar burtur av matr. nr. 726c at leggja saman við ogn síni, matr. nr. 726l. Endamálið er at bøta um parkeringsviðurskiftini á ognini og lætta trýstið á felags parkerginsøkið hjá teimum, sum búgva á Traðabrekku, harav fleiri teirra ikki hava møguleika at skipa parkering inni á egnum grundøki.

Talan er um eitt øki, sum Tórshavnar kommuna eigur, og sum kommunan hevur havt ætlanir um at nýta til at knýta Traðabrekku saman við Hoyvíksvegnum. Hesar ætlanir eru tó fyribils sleptar.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Kunngerð nr. 122 frá 22. desember 2022 um alment útboð av kommunalari fastogn.

**Upplýsingar frá umsitingini**
Tekniska fyrisiting upplýsir, at umsóknin ikki forðar fyri einari seinni íbinding millum raðabrekku og Hoyvíksvegin. Ein møgulig søla má treytast av, at lendið verður selt, sum tað er og liggur, og at umsøkjarin tryggjar markið millum matr. nr. 726l og 726c við einum múri – um neyðugt við einum stuðlamúri.

Býarskipanardeildin upplýsir, at ein treyt fyri einari sølu má vera, at kommunan framvegis kann gjøgnumføra ætlanirnar um at binda Traðabrekku og Hoyvíksvegin saman.

Stjórnarskrivstovan upplýsir, at tá ið talan er um sølu av lendi undir 300 m² er ikki krav um, at hetta skal seljast í almennum útboði. Seljast skal tó til marknaðarprís, og hesin má ásetast eftir meting við støði í grundstykkjakostnaðinum í økinum. Keyparin rindar fyri metingina.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**
Umsókn frá eigaranum av matr. nr. 726l, Tórshavn, j.nr. 24/08793-1.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | x | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | x | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Tilmæli:**
Tekniski stjóri, kommunustjórin, býarverkfrøðingurin, býararkitekturin og deildarleiðarin á Stjórnarskrivstovuni mæla til at selja eigaranum av matr. nr. 726l, Tórshavn, umleið 24 m² burtur av matr. nr. 726c, Tórshavn, fyri mettan marknaðarprís treytað av, at markið millum ognirnar verður tryggjað við múri ella um neyðugt stuðlamúri.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 11. desember 2024:** Samtykt at taka undir við tilmælinum, og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 19. mars 2025:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 27. mars 2025:** Einmælt samtykt.

# 74/25 Lendi til Kirkjugarðin í Hoyvík. Búnaðarstovan hevur sent kommununi eina eykarokning, vegna keyp og avgreiðslu av lendi til kirkjugarðin.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 26.02.2025 | 33/25 | 25/03413-2 |
| 2 Býráðsfundur | 27.03.2025 | 74/25 | 25/03413-2 |

**Upprunin til málið.**
Búnaðarstovan hevur sent kommununi eina rokning áljóðandi 317.086,50 kr. vegna keyp av lendi til kirkjugarðin í Hoyvik.

**Lýsing av málinum**

Í samband við at kommunan í 2016, fór undir ger av kirkjugarðinum í Hoyvík, fekk kommunan eina fyribils tilsøgn um keyp 25.000 fermetrum av lendi og í tí sambandi eina rokning kr. 2.311.500,00 og varð henda rokning goldin hin 01.12.2017
Matrikulering av økinum var endaliga avgreidd í november 2023.

Samlaða víddin eftir matrikulering var 28.245 fermetrar og hevur Búnaðarstovan hin 22. februar 2024, sent kommununi eina eyka rokning á kr. 317.086,50

Verkætlanin fyri kirkjugarðin er fyri langari tíð síðani lokað.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið. Gamalt mál 14/00772**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl.** Skjøl úr máli 14/00772. Tilsøgn, matrikkulskjøl, málslýsing.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís øki í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

| | Býráðsfundur<br>27. mars 2025 | Blað nr.: 183<br><br>Forkvinnunnar merki: |
|---|---|---|

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei
**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☒
Eyka játtan ☐
Lokað verkætlan ☐

| Játtast av: | | |
|---|---|---|
| Deild | Verk-ætlan | Navn |
| | | |

| Játtast á: | | | |
|---|---|---|---|
| Deild | Verk-ætlan | Navn | Nýggj verkætlan |
| | | | |

| Upphædd |
|---|
| |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| Íløgujáttan | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli:** Kommunustjórin, leiðarin á stjórnarskrivstovuni mæla til at rinda restkeypspeningin kr. 317.086,50 fíggja av konto LK65999 kirkjugarðar. Upphæddin verður flutt á projekt nr L65005 Kirkjugarður í Hoyvík. Tá rokningin til búnaðarstovuna er avgreidd, verður verkætlanin loka aftur.

**Fíggjarnevndin 26. februar 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 27. mars 2025:** Einmælt samtykt.

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>27. mars 2025 | Blað nr.: 184<br><br>Forkvinnunnar merki: |

# 75/25 Møguligt keyp av matr.nr. 370 Tórshavn. Kondittaríið. Niels Finsensgøta 11, Tórshavn.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 27.03.2025 | 63/25 | 25/03914-4 |
| 2 Býráðsfundur | 27.03.2025 | 75/25 | 25/03914-4 |

**Upprunin til málið:**
Kommunan hevur møguleika at keypa og varðveita Kondittaríið.

**Lýsing av málinum:**

Eigari av Kondittaríðnum bjóðar kommununi bygningin til keyps fyri 5,95 mill. kr. íroknað niðurtøku av uppíbygningi og høvuðsumvæling av klimaskerminum.

Partur av útbygninginum stendur inni á granna matrikklinum matr.nr. 369, og verður tí neyðugt at taka útbygningin niður.

Sambært seljara verður útbygningurin tikin niður, klimaskermurin skiftur, vindeygu og úthurð verða skift og verður bygningurin í góðum standi uttaná eftir at hetta arbeiðið er gjørt. Sí annars tilboð skjal 25/03914-6.

Íroknað tilboðsprísin er niðurtøka og burturbeining av útbygningi. Niðurtøka av timburterassu, og uppafturbygging av endaveggi, har útbygningurin var. Klædningurin verður skiftur, nýggjar vindplátur, nýggj vindeygu og ein nýggj úthurð. Hurðin í verandi høvuðsinngongd, verður umvæld og varðveitt.

**Sambært faktaskjal Kondittaríið. 25/03914-3.**

Matr.nr. 370 (Kondittaríið) liggur mitt í hjartanum í urtagarðsbýnum við framsíðum móti gongugøtuni og Lítlatún. Virksemið skal vera útvent, og bæði venda sær til gongugøtuna, men eisini túnið aftanfyri, ið verður nevnt Lítlatún.

Tað hevur alstóran týdning at varðveita nøkur av smáu húsunum í miðbýnum, fyri at tryggja skiftandi skala og eyðkenni – viðurskifti, ið hava stóran týdning fyri samleika og ljósviðurskifti í gøtuni.

Tí er ynskið at endurbøta bygningin og at varðveita skapið av mønutekjuni, og at bygningurin aftur gert eitt savningarstað í miðbýnum.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl.**
25/03914-2. Virðismeting Kondittaríið.

25/03914-3. Faktaskjal Kondittaríið.
25/03914-6. Tilboð frá HVT. Søla av bygningi + umvæling.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☐
Eyka játtan ☐
Lokað verkætlan ☐

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| | | | | | | | 5.950.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli:**
Kommunustjórin, býararkitekturin og leiðarin á Stjórnarskrivstovuni mæla til at játta kr. 5.950.000 av konto 6175, L61010 keyp av bygningum til at keypa og endurbøta bygningin og beina málið í býráðið.

**Fíggjarnevndin 27. mars 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 27. mars 2025:** Einmælt samtykt.

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>27. mars 2025 | Blað nr.: 186 |
| | Forkvinnunnar merki: |

# 76/25 Skipa serstaka nevnd

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 27.03.2025 | 76/25 | 25/04135-1 |

**Upprunin til málið**
Eingin listi kom inn til valið av staðbundnari nevnd fyri Hestnevndina í fjør. Sum kommunan hevur skilt, er tað av misgáum, at eingin listi varð gjørdur.

**Lýsing av málinum**
Tað er bæði fyri hestfólk og kommuna óheppið, at hestfólk ikki fáa tikið lut í býráðsarbeiðinum eins og hinar staðbundnu nevndirnar. Tað eru mong viðurskifti, sum hestfólk eiga at taka lut í, tá ið kommunan hevur ætlanir um eitthvørt og yvirhøvur formligt samskifti um mál, ið hava áhuga fyri hestfólk.

Í kommunustýrislógini § 36 er heimild hjá býráðnum at seta aðrar nevndir at taka sær av einstøkum málum ella at ráðgeva kommunustýrinum, fíggjarnevndini ella aðrari fastari nevnd. Kommunustýrið ásetir nærri reglur bæði um virksemi, virkisskeið og manning av serstøkum, ráðgevandi nevndum.

Hetta letur upp fyri, at býráðið setir eina nevnd, sum er mannað á sama hátt sum Hestnevndin, og sum hevur somu uppgávur. Við tað, at Hestnevndin ikki er vald í sambandi við býráðsvalið, tekur býráðið stig til at velja limir í nevndina.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Tilmæli:**
Kommunustjórin mæli til at seta serstaka nevnd sambært § 36 í kommunustýrislógini, sum tekur uppgávuna, ið staðbundin nevnd fyri Hest vanliga hevur, og at velja 4 limir í nevndina, herundir borgarstjóran, sum er forkvinna í nevndini.

**Býráðsfundur 27. mars 2025:** Einmælt samtykt at velja borgarstjóran sum fasta forkvinnu í staðbundna nevnd fyri Hest og harumframt at velja Arnu Silvurstein, Fridu Súsonnu Lenvig, Kára Niclasen og Kára Johansen í nevndina.

# 77/25 Val av einum limi og tiltakslimi í SEV-nevndina - 24/08894

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 09.01.2025 | 10/25 | 25/00269-1 |
| 2 Býráðsfundur | 27.03.2025 | 77/25 | 25/00269-1 |

**Málslýsing:**
4. grein

NEVNDIN

Stk. 1. Til at hava yvirstjórn í felagsins viðurskiftum verður á aðalfundinum vald ein nevndsambært stk. 2.

Stk. 2. Í nevndina verða valdir sjey limir soleiðis, at Vága, Streymoyar, Eysturoyar, Norðoya ogSandoyar sýslur hvør velja ein, Suðuroyggin ein og Tórshavnar kommuna einnevndarlim.

Valið fer fram á tann hátt, at limakommunurnar í hvørjum øki sær seta upp valevnir ogatkvøða um hesi.

Um nevndarlimur flytur úr økinum, har hann er valdur, tekur varalimurin við, og nýggjurvaralimur verður valdur.

Meirilutaval.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin mælir býráðnum til at velja ein lim og ein tiltakslim í Sev-nevndina.

**Býráðsfundur 14. november 2024:** Einmælt samtykt at velja Heðin Mortensen í SEV-nevndina.

**Býráðsfundur 09. januar 2025:** Samtykt at velja Heðin Mortensen í SEV-nevndina og at velja Annitu á Fríðriksmørk til tiltakslim.

**Ískoyti:**
Sambært grein 3 í Partafelagssáttmálanum millum SEV og kommununa um Fjarhitafelagið er ásett, at til ber ikki at vera nevndarlimur/varalimur bæði í nevndini fyri SEV og nevndini fyri Fjarhitafelagið í senn.

**Býráðsfundur 27. mars 2025:** Tikið av skrá.

## 78/25 Eldrapolitikkur

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Heilsu- og eldranevndin | 13.02.2025 | 7/25 | 25/02482-3 |
| 2 Byggi- og býarskipanarnevndin | 10.03.2025 | 43/25 | 25/02482-3 |
| 3 Tekniska nevnd | 10.03.2025 | 14/25 | 25/02482-3 |
| 4 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 10.03.2025 | 19/25 | 25/02482-3 |
| 5 Vinnunevndin | 10.03.2025 | 8/25 | 25/02482-3 |
| 6 Havnanevndin | 11.03.2025 | 17/25 | 25/02482-3 |
| 7 Mentamálanevndin | 12.03.2025 | 43/25 | 25/02482-3 |
| 8 Trivnaðarnevndin | 13.03.2025 | 18/25 | 25/02482-3 |
| 9 Fíggjarnevndin | 19.03.2025 | 41/25 | 25/02482-3 |
| 10 Fíggjarnevndin | 27.03.2025 | 61/25 | 25/02482-3 |
| 11 Býráðsfundur | 27.03.2025 | 78/25 | 25/02482-3 |

**Upprunin til málið**

**Lýsing av málinum**
Í sambandi við at eldraøkið varð lagt til kommunurnar at umsita 1. januar 2015, varð eldrapolitikkur orðaður og samtyktur á býráðsfundi 11. desember 2014.

"Virkin og Vakin alt lívið" hevði til endamáls at lýsa, hvussu Tórshavnar Kommuna kundi skipa og virka fyri at samskapa eitt livandi aldrandi øki í støðugari menning við høgari dygd og trygd. Hetta var í sambandi við at eldraøkið í 2015 var flutt frá land til kommunur.

Í tíðarskeiðnum frá 2015 og fram til í dag eru alskyns tilboð ment til aldrandi borgarar í Tórshavnar kommunu, bæði tá ræður um heilsurøkt og umsorgan, bústovnar til røktarkrevjandi, heilsustimbran og fyribyrgjandi rørsluátøk, mentan og ítriv v.m.

Eldrapolitikkurin er 10 ára gamal og mett var at tíðin var komin til at endurskoða eldrapolitikkin, serliga við atliti til demografisku broytingar í samfelagnum komandi árini.

Hetta er eisini í trá við tilmæli frá arbeiðsbólki, sum fyri tíð síðani var settur at lýsa og greina avbjóðingar, vísandi til framtíðartrygging av eldraøkinum. Eitt av tilmælunum, sum arbeiðsbólkurin kom til, var at endurskoða eldrapolitikkin.

Heilsu- og eldranevndin avgjørdi tí á fundi í mai 2024, at verandi eldrapolitikkur skuldi endurskoðast, og síðani hevur verið arbeitt við málinum.

Í hesum sambandi varð byrjað við at skipa fyri einari almennari verkstovu í Tilhaldinum 21. mai 2024, har eldri fólk í Tórshavnar kommunu høvdu møguleika at koma við viðmerkingum og hugsanum um, hvat ein eldrapolitikkur eigur at innihalda.

Úrslitið av hesum saman við viðmerkingum frá áhugapørtum er eitt uppskot um nýggjan eldrapolitikkinum galdandi fyri tíðarskeiðið 2025 – 2030.

Í nýggja uppskotinum verður dentur lagdur á eitt nú virkni, sjálvbjargni og sjálvsavgerðarrætt. Harumframt at hava eina demensvinarliga kommunu.

Uppskotið til nýggjan eldrapolitikk hevur verið til hoyringar hjá eindarleiðarum í Heilsu- og umsorganartænastuni, á ymsu deildum í TK og hjá limum í Heilsu- og eldranevndini.

Av tí at Eldraráðið ikki er skipað í løtuni, hevur politikkurin ikki verið til hoyringar har. Eldraráðið var tó boðið við til almennu verkstovuna sum var í Tilhaldinum og var umboða har.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/léttar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Tilmæli:**
Heilsu- og umsorganarstjórin og fulltrúi í Heilsu- og umsorganarfyrisitingini mæla Heilsu- og eldranevndini til at taka undir við uppskotinum til nýggjan eldrapolitik, at leggja málið í aðrar faknevndir til umrøðu og at leggja málið fyri býráðið umvegis fíggjarnevndina til endaliga støðutakan.

**Heilsu- og eldranevndin 13. februar 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 10. mars 2025:** Umrøtt.

**Tekniska nevnd 10. mars 2025:** Umrøtt.

**Vinnunevndin 10. mars 2025:** Umrøtt.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 10. mars 2025:** Umrøtt.

**Havnanevndin 11. mars 2025:** Umrøtt.

**Mentamálanevndin 12. mars 2025:** Umrøtt.

**Trivnaðarnevndin 13. mars 2025:** Umrøtt.

**Fíggjarnevndin 19. mars 2025:** Útsett.

**Fíggjarnevndin 27. mars 2025:** Samtykt at taka undir við heilsu- og eldranevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 27. mars 2025:** Einmælt samtykt.

| | | |
|---|---|---|
| | **Býráðsfundur**<br>27. mars 2025 | Blað nr.: 192<br><br>Forkvinnunnar merki: |

# 79/25 Nýtt skiftingarrúm í Virknishøllini í Finsen

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 12.03.2025 | 37/25 | 25/03568-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 19.03.2025 | 43/25 | 25/03568-1 |
| 3 Býráðsfundur | 27.03.2025 | 79/25 | 25/03568-1 |

**Upprunin til málið**
Samtykt í fíggjarætlanini 2025, løgukonta 5775 við upphædd 1.000 tkr., til skiftingarrúm í Virknishøllini í Finsen.

**Lýsing av málinum**
Á sumri 2020 lat Virknishøllin í Finsen alment upp. Virknishøllin er høllin, ið áður var niðara fimleikahøllin í Tórshavnar kommunuskúla, sum í 2017 gjørdist til lestrarbústaðarhúsið Finsen. Visjónin við Virknishøllini er, at hon skal geva fólki møguleika fyri sjálvskipaðum virksemi og nýta høllina til alskyns rørslu og spæl, harav navnið Virknishøllin.

Ein avbjóðing í Virknishøllini er, at ongin skiftingarrúm eru. Hølið er tó tøkt til hetta endamálið, har gomlu skiftingarrúmini vóru. Sbrt. mál 17/01362 (Virknishøll í Finsen) bleiv eitt frával gjørt, tá talan var um at umvæla gomlu skiftingarrúmini, og eru tey tá tikin niður. Í dag er skiftingarrúmið eitt tómt høli.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
mál 17/01362 (Virknishøll í Finsen)

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☒

| Býráðsfundur<br>27. mars 2025 | Blað nr.: 193 |
|---|---|
| | Forkvinnunnar merki: |

Eyka játtan ☐

Lokað verkætlan ☐

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| 5775 | LK57042 | Skiftingarrúm í Virknishøllini | 5775 | Nýggj verkætlan | Skiftingarrúm í Virknishøllini | | 1.000.000 kr. |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til:
- at flyta kr. 1.000.000 kr. av løgukonto 5775 LK57042 á nýggja projektkonto, við heitinum “Skiftingarrúm í Virknishøllini”
- at beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 12. mars 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 19. mars 2025:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini við teirri rætting, at peningurin skal flytast av løgukonto LK57050 Finsen fimleikahøll og skiftingarrúm. At heimila umsitingini at bjóða arbeiðið út og leggja fyri aftur fíggjarnevndina, áðrenn arbeiðið fer í gongd. Málið beint í býráðið.

**Býráðsfundur 27. mars 2025:** Einmælt samtykt.

## 80/25 Oyggjaleikir 2027 - Fígging

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 12.02.2025 | 28/25 | 25/02736-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 26.02.2025 | 21/25 | 25/02736-1 |
| 3 Býráðsfundur | 27.02.2025 | 51/25 | 25/02736-1 |
| 4 Býráðsfundur | 27.03.2025 | 80/25 | 25/02736-1 |

**Upprunin til málið**
Oyggjaleikir koma til Føroyar í 2027 og fyrireikingaarbeiðið er so smátt farið í gongd. Sbrt. ÍSF verða fylgjandi ítróttargreinar í Tórshavnar kommunu:
Badminton, borðtennis, fótbóltur, frælsur ítróttur, judo, kurvabóltur, skjóting, súkkling, svimjing og tennis.

Hyggja vit yvirskipað eftir hvussu hesir ítróttafasilitetirnir eru fyri, so eru skjótibreytin og langhylurin nýggj. Í hinum endanum er Gundadalshøllin í ringum standi, og ábendingar eru um, at rennibreytin, sum er frá 2008, er slitin (Hetta skal kannast av "test-institutti"). Tveir tennisvøllir eru í Gundadali, men kravið er at tað skulu verða tríggir vøllir.
Flestu hallirnar klára at taka ímóti leikunum í dag. Hallirnar eru tó sera nógv brúktar og slit sæst á teimum. Tískil má nøktandi orka setast av til viðlíkahaldsarbeiði, so hallirnar eisini eru nossligar tá oyggjaleikirnir verða.

Havandi í huga at oyggjaleikirnir verða í Føroyum um 2 ár, so mælir umsitingin til, at uppraðfesta fyrireikingararbeiðið beinanvegin.
Fyri at kunna lúka tær treytir sum Oyggjaleikirnir 2027 krevja, metir umsitingin at tað er umráðandi, at seta upphædd av til tær íløgur, sum væntandi verða. Alt hetta krevur samstundis eitt ávíst samskipanararbeiðið, bæði við ÍSF, sersambond, fyrireikarar av oyggjaleikunum og TK. Harumframt mugu pengar setast av til ráðgeving í teimum førunum har brúk er fyri tí. Umsitingin metir, at til hetta krevst at seta 1 mió kr. av í 2025.

**Lýsing av málinum**

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>27. mars 2025 | Blað nr.: 195<br><br>Forkvinnunnar merki: |

| | **Fyri Tórshavnar kommunu** | **Fyri ávís økir í kommununi** | **Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir** | **Fyri vinnuna** |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/léttar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei
**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☐
Eyka játtan ☒
Lokað verkætlan ☐

| **Játtast av:** | | | **Játtast á:** | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| 5775 | | Frælsur ítróttur, Høll | 1312 | | | Oyggjaleikir 2027 | 1.000.000 kr. |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | 1.000.000 |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | 2025 |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til:

- At uppraðfesta fyrireikingarabeiðið til Oyggjaleikirnar 2027
- At játtaðar verða kr. 1.000.000 av Kt 5775 (Frælsur ítróttur, Høll) yvir á kt 1312 Trivnaðarfyrisitingin.
- At málið verður beint í býráðið sum eykajáttan umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 12. februar 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið til tvær viðgerðir um fíggjarnevndina.

Annfinn Brekkstein var ikki við í viðgerðini av málinum.

**Fíggjarnevndin 26. februar 2025:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið sum eykajáttanarmál, ið tørvar tvær viðgerðir.

**Býráðsfundur 27. februar 2025:** Heidi Lava Elgeirsdóttir legði fram broytingaruppskot við tilmæli um at taka undir við fíggjarnevndini við teirri broyting, at kr. 1.000.000,00 verða játtaðar av LK 57049 Oyggjaleikir 2027 yvir á kt 1312 Trivnaðarfyrisitingin.

Broytingaruppskotið varð einmælt samtykt við fyrstu viðgerð.

Uppskotið beint til aðru viðgerð.

**Býráðsfundur 27. mars 2025:** Einmælt samtykt við aðru viðgerð.

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>27. mars 2025 | Blað nr.: 197<br><br>Forkvinnunnar merki: |

# 81/25 Føroya Sjósavn : Umsókn um at leingja játtanina og fáa part úgoldið til projektering

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 12.02.2025 | 17/25 | 25/00533-2 |
| 2 Mentamálanevndin | 12.03.2025 | 31/25 | 25/00533-2 |
| 3 Fíggjarnevndin | 19.03.2025 | 42/25 | 25/00533-2 |
| 4 Býráðsfundur | 27.03.2025 | 81/25 | 25/00533-2 |

**Upprunin til málið**
Mál, sum er í gongd, og umsókn móttikin 18. september 2024.

**Lýsing av málinum**
Føroya Sjósavn fekk í februar 2024 játtaðar 15 mió kr. til at byggja nýtt sjósavn. Játtanin gekk út 31. desember 2024, og Sjósavnið søkir nú um at fáa longt játtanina.

Sambært leiðreglunum um stuðul til íløgur, eru stuðulsjáttanir avmarkaðar til trý ár.

Umframt umsóknina um at leingja játtanina, søkir Sjósavnið eisini um loyvi til at nýta 2,5mió av játtanini til projektering, sum skulu gjaldast út í ár.

Samlaði kostnaðurin av projektering er mettur at vera 10.357.942kr.

Sjósavnið er í samband við landið um eisini at stuðla projekteringini, og fleiri fyritøkur hava játtað at stuðla við upphæddum millum 50.000 og 200.000kr.

Fíggingin av sjálvari byggingini er væl ávegis – seinasta tilsøgnin, tey hava fingið eru 35 mió frá A.P.Møller Fonden. Afturat hesum hava Tórshavnar kommuna, landið, fólkatingið o.o. játtað stuðul til byggiverkætlanina, sum samanlagt er metta at kosta um 107mió krónur.

Eftir ætlan skal Føroya Sjósavn lata upp í 2027.

Føroya Sjósavn fer at hava stóran týdning fyri mentanarlívið í Tórshavnar kommunu eins og fyri gransking, ferðavinnu og annað. Staðsetingin á Argjum er ómetaliga góð, og fer umframt at vera ein mentanarstovnur fyri alla kommuna og landið, væntandi at vera ein savningarstaður fyri argjafólk. Sjósavnið vekir longu altjóða áhuga, og kann gerast ein sterkur viðspælari hjá teimum, sum granska í havtilfeingi o.ø. Eisini skúlar og útbúgvingarstovnar fara at fáa ágóðan av sjósavninum, strandarmentanin verður styrkt, og borgarin fær eitt stórfingið savn at vitja.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Leiðreglur samtyktar av Mentamálanevnd Tórshavnar Býráðs 3. september 2015

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

| Býráðsfundur<br>27. mars 2025 | Blað nr.: 198<br>Forkvinnunnar merki: |
|---|---|

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei
**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☒
Eyka játtan ☐
Lokað verkætlan ☐

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Deild | Verk-ætlan | Navn | Deild | Verk-ætlan | Navn | Nýggj verkætlan | Upphædd |
| 5370 | Føroya Sjósavn | Stuðul til Íløgur | | | | | 2.500.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| Íløgujáttan | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at leingja tilsøgnina á 15 mió. kr. við trimum árum, so hon gongur út 31. desember 2027. Harumframt verður mælt til at játta umsóknini um at nýta 2,5 mió. kr. av samlaðu játtanini á 15 mió. kr. til projektering og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 12. februar 2025:** Umrøtt. Verður tikið upp aftur á næsta fundi í mentamálanevndini.

**Mentamálanevndin 12. mars 2025:** Ein meiriluti, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Bergur Dam Jensen, Heðin Mortensen og Birgir Nielsen, tekur undir við tilmælinum og beinir málið í býráðið um fíggjarnevndina.

Ein minniluti, Annfinn Brekkstein, tekur ikki undir við tilmælinum at játta pening til projektering, tí tað ikki er eitt bygningsverk, sum kommunan stendur fyri.

**Fíggjarnevndin 19. mars 2025:** Ein meiriluti, Elsa Berg, Kristianna Winther Poulsen, Guttormur í Skála og Høgni Vilhelmsen, tekur undir við meirilutanum í mentamálanevndini og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson, tekur ikki undir við málinum, men mælir til at halda seg til upprunaligu tilsøgnina um at játta 15 mió. kr. til ætlanina.

**Býráðsfundur 27. mars 2025:** Atkvøtt varð um tilmælið frá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 11 atkvøðum fyri, tveimum atkvøðum ímóti og ongari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Kristianna Winther Poulsen, Bergur Robert Dam Jensen, Guttormur í Skála, Sunnvá Dahl Høgfeldt, Høgni Vilhelmsen og Birgir Nielsen.

Ímóti atkvøddu: Tróndur Sigurðsson og Kári Johansen.

## 82/25 Nýtt røktarheim og við røktaríbúðum

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 13.01.2025 | 11/25 | 25/01683-1 |
| 2 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 14.01.2025 | 7/25 | 25/01683-1 |
| 3 Býráðsfundur | 30.01.2025 | 43/25 | 25/01683-1 |
| 4 Heilsu- og eldranevndin | 27.03.2025 | 12/25 | 25/01683-1 |
| 5 Fíggjarnevndin | 27.03.2025 | 62/25 | 25/01683-1 |
| 6 Býráðsfundur | 27.03.2025 | 82/25 | 25/01683-1 |

**Upprunin til málið**
Málið er lýst í fylgiskjali *Nýtt røktarheim og við røktaríbúðum jnr. 25/01683-2*.

**Ískoyti**
Víst verður til samtykt hjá undanfarnu byggi- og býarskipanarnevnd hin 11. desember 2024, har tað varð samtykt í máli nr. 23/05639, Nýggj serstøk byggisamtykt fyri røktarheim á Stórubrekku, matr. nr. 138a, Hoyvík, at gera eina umhvørvisárinsmeting, áðrenn nakað arbeiði fer í gongd.

**Søgulig gongd**
Grundøkið, er partur av einum størri øki í býarpartinum 'Hoyvíkshagi suður'", sum varð lagdur til rættis mitt í 80´árunum. Økið hevur so statt í mong ár verið ætlað til byggilendi. Søguliga hevur byggisamtyktin fyri økið verið hendan:

- 1982: Byggisamtyktarkort av Hoyvík, vísir alt økið við Stórubrekku sum A1, ætlað sethúsum.
- 1996: Økið er broytt til A3, sum fevnir um blandaða bústaðar- og miðstaðarbygging.
- 2020: Partur av Dalinum Langa verður broyttur frá A3 til D1, sum verður lagt til almenning, náttúrufriðingar- og mentanarlig endamál (j.nr. 18/04229).
- 2022: Økið á Stórubrekku verður broytt frá A3 til D3, sum fevnir um stórar almennar stovnar fyri umsiting, skúlaskap, heilsurøkt og tílíkt (j.nr. 22/00349).
- 2024: Serstøk byggisamtykt fyri Stórubrekku verður galdandi fyri D3 økið (j.nr 23/05639). Serstaka byggisamtyktin lýsir nágreiniliga, hvat er loyvt at byggja á lendinum. Tekningar, so sum støðuplanur, skurðar og visualiseringar vísa ætlaðu byggingina.

**Kanning og vernd av økinum**
Økið, har røktarheimið er staðsett, er í fleiri umførum kannað. Eitt nú hevur Jarðfeingi gjørt eina frágreiðing til Tórshavnar kommunu um "Nøkur fyribrigdi í landslagnum á Stórubrekku í Hoyvík". Sí skjal, j.nr.25/01683-4

Somuleiðis hevur Býarskipanardeildin í byggiskránni til nýggja røktarheimið lagt stóran dent á at varðveita upprunalendið kring bygningina. Viðfest er brot úr byggiskránni, sum fevnir um lýsing av "býarskipan og grundøki". Sí skjal, j.nr.25/01683-3

Í útbjóðingartilfarinum verður álagt arbeiðstakaranum, ið skal byggja røktarheimið, at varðveita upprunalendi í størst møguligan mun, m.a. við at endurnýta partar av flagnum, sum verður grivið av. Viðfest er brot úr arbeiðsfrágreiðingini hjá lendisarkitektinum. Sí skjal, j.nr. 25/01683-11.

**Status í verkætlanini:**

Byggiloyvi varð útskrivað í juni, høvuðsprosjektið er bjóðað út, og lisitatiónin verður 31. januar 2025. Tá ið sáttmáli er gjørdur við vinnandi arbeiðstakaran, er so statt klárt at fara undir at byggja røktarheimið á Stórubrekku.

Vísandi til omanfyristandandi metir umsitingin, at tilgongdin í sambandi við ætlaðu bygningina á Stórubrekku hevur fylgt øllum teimum mannagongdum og krøvum, sum verða sett til slíkar bygningar, herundir kanningar, sum eru gjørdar av landslagnum í økinum, jarðfrøðiligar kanningar, boriroyndir og annað.

Tað er ein sannroynd, at alsamt størri sjóneyka verður sett á ávirkanina, sum býarmenning og bygging hevur á náttúruna, umhvørvið og nærumhvørvið. Einki krav er um, at árinsmetingar skulu gerast í sambandi við vanliga bygging. Formell krøv finnast bert í mun til verkætlanir innan el-framleiðslu – í sambandi við uppsetan av vindmyllum – og í sambandi við verkætlanir á sjónum, og tá ið sjóøki verður fylt upp.

Spurningurin um, í hvønn mun og hvussu árinsmetingar eiga at verða gjørdar, eigur tó at verða viðgjørdur, hvørja ferð kommunan fer í gongd við at inndraga nýtt byggilendi og í gongd við størri bygningar og útstykkingar, og mælt verður tí til, at mannagongdir verða gjørdar hesum viðvíkjandi.

Hetta er eitt arbeiði, sum er málsøki hjá náttúru- og umhvørvisnevndini, og mælt verður tí til, at málið verður reist har.

Umsitingin mælir tí til, at umhvørvisdeildin hjá Tórshavnar kommunu fer undir at gera mannagongdir fyri umhvørvisárinsmetingar í sambandi við býarmenning og bygging í kommununi.

**Skjøl**
25/01683-2 Upprunaliga málslýsingin: Nýtt røktarheim og við røktaríbúðum (jnr. 17/03196)
25/01683-3 Byggiskrá
25/01683-4 Nøkur fyribrigdi í landslagnum á Stórubrekku í Hoyvík
25/01683-11 K02_C08.2_N01 Arbeiðs- og bygningslutafrágreiðingar, lendisarbeiði LARK 28-30

**Tilmæli**
Heilsu- og umsorganarstjórin, miðfyrisitingarstjórin, tekniski stjórin, býararkitekturin og leiðarin á bygningsdeildini mæla til:

- At nevndin tekur omanfyristandandi málsgongd til eftirtektar, har staðfest verður, at nøktandi kanningar eru gjørdar av økinum, og at neyðugt tí ikki er við fleiri kanningum í ítøkiliga málinum, og harumframt at umsitingin fer undir eina tilgongd at gera mannagongdir fyri umhvørvisárinsmetingar.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 13. januar 2025:** Ein meiriluti, Anja Weyhe, Bergur Robert Dam Jensen og Heidi Lava Elgeirsdóttir, samtykti at taka undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Kári Johansen og Birgir Nielsen, krevur málið fyri býráðið.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 14. januar 2025:** Málið umrøtt.

**Býráðsfundur 30. januar 2025:** Tróndur Sigurðsson og Kári Johansen løgdu fram broytingaruppskot um at gera umhvørvisárinsmeting í økinum, áðrenn arbeiðið at byggja røktarheim í Stórubrekku fer í gongd.

Atkvøtt varð um broytingaruppskotið, ið fall við fimm atkvøðum fyri, sjey atkvøðum ímóti og einari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Tróndur Sigurðsson, Kári Johansen, Birgir Nielsen, Høgni Vilhelmsen og Annfinn Brekkstein.

Ímóti atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Bergur Robert Dam Jensen og Kristianna Winther Poulsen.

Blankt atkvøddi: Guttormur í Skála.

Síðani varð atkvøtt um tilmælið frá meirilutanum í byggi- og býarskipanarnevndini, ið varð samtykt við átta atkvøðum fyri, trimum atkvøðum ímóti og tveimum blankum atkvøðum.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Bergur Robert Dam Jensen, Kristianna Winther Poulsen og Guttormur í Skála.

Ímóti atkvøddu: Tróndur Sigurðsson, Kári Johansen og Annfinn Brekkstein.

Blankt atkvøddu: Birgir Nielsen og Høgni Vilhelmsen.

**Ískoyti:**
Verkætlanin, Røktarheimið á Stórubrekku, hevur havt lisitatión tann 31. Januar 2025. Fimm arbeiðstakarar bjóðaðu uppá arbeiðið. Hesir vóru Articon, HVT, J&K Petersen, KANJON og MTV Byggivirki.

Tilboðini, sum komu inn, vóru soljóðandi:

| | |
|---|---|
| Articon: | 297.420.971,00 kr. u/mvg |
| HVT: | 327.950.467,00 kr. u/mvg |
| J&K Petersen: | 336.682.229,00 kr. u/mvg |
| KANJON: | 318.590.098,00 kr. u/mvg |
| MTV Byggivirki: | 326.912.935,00 kr. u/mvg |

Umsitingin hjá Tórshavnar kommunu hevur verið í sáttmálasamráðingum við tilboðsveitara, Articon, um verkætlanina Røktarheimið á Stórubrekku. Umsitingin, umboð frá Articon, heildarráðgevi, byggiharraráðgevi og undirráðgevar hava gjøgnumgingið tilboðslistarnar og prosjektið sum heild. Articon hevur nú príssett meir/minniveitingarnar. Talan er um eitt samlað tilboð frá Articon áljóðandi:

**Samlað tilboð frá Articon:** 296.270.627,00 u/mvg

Arbeiðstøkusáttmáli millum Tórshavnar kommunu og Articon
Umsitingin hevur gjørt uppskot til arbeiðstøkusáttmála millum Tórshavnar kommunu og Articon fyri høvuðsarbeiðstøkuni fyri verkætlanina, Røktarheimið á Stórubrekku, sí j. nr 25/01683-16.

Arbeiðstøkusáttmálin millum Tórshavnar kommunu og Articon at byggja nýtt Røktarheim á Stórubrekku er treytaður av, at málið um partshoyring við øllum, sum hartil hoyrir, er liðugt og avklárað, og at málið verður samtykt í øllum avvarandi nevndum í Tórshavnar kommunu.

Mett byggitíð er 2 ár og 8 mánaðir. Arbeiðið at byggja Røktarheimið skal eftir ætlan byrja á vári 2025. Og arbeiðið skal vera liðugt ultimo 2027.

<u>Sáttmáli millum Tórshavnar kommunu og Ráð</u>
Umsitingin hevur gjørt uppskot til sáttmála millum Tórshavnar kommunu og fyritøkuna, Ráð, at standa fyri byggiharraráðgeving og byggileiðslu fyri verkætlanina, Røktarheimið á Stórubrekku, sí j. nr 25/01683-17.

<u>Samlað kostnaðarmeting</u>
Umsiting hevur gjørt ein samlaðan heildarkostnað fyri verkætlanina, Røktarheimið á Stórubrekku. Her er talan um meirvirðisgjald, Lønar- og prísvøkstur(index regulering), óvæntaður kostnað, list og prýði, tryggingarviðurskifti, byggileiðsla, prosjektumsiting, og onnur viðurskifti, sum skal koma afturat HVÙ kostnaði. Samlaða kostnaðarmetingin liggur í málinum, sí j. nr 25/01683-18.

**Upplýsing frá umsitingini**

<u>Partshoyring</u>
Byggimálsdeildin hevur í samráð við Løggdeildina hjá Tórshavnar kommunu sent málið um byggiloyvið á Røktarheimið á Stórubrekku út til partshoyring hjá grannum, sum búgva nærhendis Røktarheiminum á Stórubrekku. Niðurstøða á málinum um partshoyring verður lagt fyri Byggi og býarskipanarnevnd 31.03.2025, og tá verður málið eftir ætlan endaliga avgreitt.

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☒
Eyka játtan ☐
Lokað verkætlan ☐

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| 2775 | LK27012 | Røktarheimið á Stórubrekkur | 2775 | L27012 | Røktarheimið á Stórubrekku | | 50 mió. kr |

**Tilmæli:**
Bygginevndin, heilsu- og umsorganarstjórin, miðfyrisitingarstjórin, tekniski stjórin, býararkitekturin og leiðarin á bygningsdeildini mæla til:

- at tikið verður undir við fyriliggjandi arbeiðstøkusáttmála millum Tórshavnar kommunu og Articon, og at byggiarbeiðið verður sett í gongd eftir teimum treytum, sum lýst omanfyri, sí j. nr 25/01683-16
- at tikið verður undir við fyriliggjandi sáttmála millum Tórshavnar kommunu og Ráð, sí j. nr 25/01683-17.
- At játtaðar verða 50 mió. kr av LK27012, Røktarheimið á Stórubrekku til L27012, Røktarheimið á Stórubrekku
- at tikið verður undir við fyriliggjandi samlaðu kostnaðarmetingini, sí j. nr 25/01683-18 og at fíggja samlaða kostnaðarmetingina í byggitíðini
- at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Heilsu- og eldranevndin 27. mars 2025:** Ein meiriluti, Kristianna Winther Poulsen, Annita á Fríðriksmørk, Heidi Lava Elgeirsdóttir og Birgir Nielsen, samtykti at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

Ein minniluti, Kári Johansen, atkvøður blankt.

**Fíggjarnevndin 27. mars 2025:** Samtykt at taka undir við heilsu- og eldranevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 27. mars 2025:** Atkvøtt varð um tilmælið frá fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 12 atkvøðum fyri, einari atkvøðu ímóti og ongari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Kristianna Winther Poulsen, Bergur Robert Dam Jensen, Guttormur í Skála, Sunnvá Dahl Høgfeldt, Kári Johansen, Høgni Vilhelmsen og Birgir Nielsen.

Ímóti atkvøddi: Tróndur Sigurðsson.

## 83/25 Arkitekturpolitikkur fyri Tórshavnar kommunu - 22/05054

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 10.03.2025 | 41/25 | 25/03681-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 19.03.2025 | 46/25 | 25/03681-1 |
| 3 Býráðsfundur | 27.03.2025 | 83/25 | 25/03681-1 |
| 4 Býráðsfundur | | | 25/03681-1 |

**Upprunin til málið**
Hetta málið er eitt framhald av málinum “Arkitekturpolitikkur fyri Tórshavnar Kommunu” – j.nr. 22/05054. Sí viðheftu upprunamálslýsingina: *Upprunalig málslýsing Arkitekturpolitikkur fyri Tórshavnar Kommunu*, j.nr. 25/03681-5

Byggi- og býarskipanarnevndin samtykti 7. november 2022 at taka undir við tilmælinum hjá umsitingini um at fara undir ein Arkitekturpolitikk fyri Tórshavnar kommunu.

Málið hevur ikki verið til viðgerðar á býráðsfundi enn.

Umsitingin er farin í eina arbeiðstilgongd at fyrireika hesa verkætlanina. Tað, sum nú fyriliggur er ein meira ítøkilig arbeiðsætlan, við einum arbeiðssetningi, sum greiðir frá vavinum á verkætlanini og ætlaðu arbeiðstilgongdini framyvir, umframt at ein kostnaðarmeting er gjørd, sum skal samtykkjast.

**Lýsing av málinum**
Nógv ferð er á byggivinnuni, og í miðstaðarøkinum er stórur eftirspurningur og áhugi hjá mennarum, arbeiðstakarum og íleggjarum at byggja, bæði til vinnuna, tað almenna økið umframt tann privata bústaðarmarknaðin.
Fyri hvørt einstakt inntriv og átak, sum verður framt, roynir Tórshavnar kommuna at tryggja, at verkætlanin er í trá við fakliga skynsama býarskipan og eina grundleggjandi hugsjón um ein gott og burðardygt býar- og bygdaumhvørvi fyri borgaran við einum søguliga rótfestum, sterkum og staðbundnum samleika.

Hetta krevur tó nógva orku og nógv samskifti í hvørjum einstøkum føri, og tørvur hevur verið á einum skjali, sum vísast kann til í hesi samskiftistilgongdini. Eini skjalfestari vegleiðandi kunngerð, sum greiðir frá teimum hugsjónum sum kommunan hevur, og við eini ítøkiligari og greiðari kravfesting sum er politiskt samtykt og sostatt lógliga bindandi.

Býarskipanardeildin hjá Tórshavnar kommunu seinastu árini havt eitt ynski um at skjalfesta og almannakunngera ein arkitekturpolitikk, sum er sergjørdur til tørvin og viðurskiftini í Tórshavnar kommunu.
Nevnast kann, at tað er vanligt í londunum kring okkum, at størri kommunur hava egnan arkitekturpolitikk, sum eisini verður nýttur á líknandi hátt.

Ein **arkitekturpolitikkur fyri Tórshavnar kommunu** er sostatt ein bóklingur, sum ítøkiligger og verjir hugsjónina um góða og trygga býar- og bygdamenning í allari kommununi, umframt at hann eisini er kunnandi, kveikjandi og stimbrar tilvitskuna um samleika, huglag og aðrar dygdir í tí bygda og óbygda umhvørvinum í kommununi.

**Arkitekturpolitikkurin** verður ein bóklingur undir **Kommunuætlanini**.
Hann skal fevna um alla kommununa, og verður dagførdur 5 hvørt ár, ella eftir tørvi.

Endamálið er at tryggja:

- At vísast kann til eina greiða og langskygda býarskipanarliga og arkitektoniska hugsjón um hvussu Tórshavnar kommuna skal mennast í býi, á bygd, og í náttúruni.

- At lunnar verða lagdir undir eina savnandi mentan, eitt fólksligt samskifti og eina felags tilvitsku um býarskipanarliga dygd og arkitektoniskt virði, søgu, arv, samleika og staðbundni.

- At mennarar, arbeiðstakarar, og borgarar, hava greiðari ynskir og bindandi kravfestingar at taka atlit til tá verkætlanir verða framdar í tí bygda umhvørvinum og í náttúruni.

- At fleiri ymsar deildir og umsitingarøkir hjá Tórshavnar kommunu, so sum byggimálsdeild, tekniska deild, mentamáladeild og Tórshavnar Havn lætt kunnu taka atlit, gera tilvísingar, og gagnnýta skjalið sum ein amboðskassa í teirra arbeiði.

- At verandi politiska skipan og komandi skipan, hava eina greiða langskygda ætlan at taka atlit til. Og at tað er lætt at kunna seg um tær fakligu grundgevingarnar, og tey ástøðiligu akkersfestini sum vera borðin fram í skjalinum, sum kunnu vera viðkomandi í raðfestingararbeiðinum og í nevndarviðgerðini av einum máli.

- At serlig eyðkenni, so sum søguligir bygningar, serlig býarrúm, og sermerkt býarskipanarlig brøgd í Tórshavnar kommunu fáa eina størri viðurkenning og virðismeting.

**Verkætlanin**
Ætlanin er at lidna uppskotið Arkitekturpolitikkur fyri Tórshavnar kommunu verður lagt fyri býráðið, umvegis viðkomandi politiskar nevndir, seint á heysti 2025.

Í viðhefta arbeiðssetninginum verður greitt frá hvussu verkætlanin og arbeiðsgongdin er uppbygd.

Sí viðheftu skjølini:
*Uppskot um arbeiðssetning - Arkitekturpolitikkur fyri TK 28feb2025*, j. Nr. 25/0368-2
*Ætlað verkætlanartilgond - Arkitekturpolitikkur 28feb2025*, j.nr. Nr. 25/0368-3

Í stuttum kann sigast, at verkætlanin verður deild upp í fylgjandi arbeiðsstig:

A. Fyrireikingarstig

B. Miðling, kveiking og orðaskifti

Hetta er m.a. við átøkum á heimasíðuni hjá Tórshavnar kommunu, myndakapping,

einum átaksfilmi, borgaraluttøku við fyrilestrum og temadøgum.

C. Tilfarsviðgerð og innanhýsis kjakupprit

D. Almenn borgarahoyring og nevndarviðgerð av lidna skjalinum

E. Eftirviðgerð og leypandi dagføringar

Við ætlaðum miðlaátøkum, borgaraluttøkutilgongd við fyrilestrum og temadøgum og øðrum verður verkætlanin mett at kosta kr. 500.000.

Sí viðheft skjal: *kostnaðarmeting Arkitekturpolitikkur dagf28feb2025*, j.nr. Nr. 25/0368-4

**Ábyrgd og fyrisiting**

Áðrenn endaligu viðgerðina av lidna uppskotinum um Arkitekturpolitikkinum í Býráðnum, verða býráðslimirnir settir inn í tilfarið við eini gjøllari gjøgnumgongd, har greitt verður frá tilgongdini og møguligum viðkomandi mótmælum og viðmerkingum, sum hava verið.

Tá arkitekturpolitikkurin er samtyktur, hevur Býráðið yvirskipaðu ábyrgdina av arkitekturpolitikkinum, og ímeðan fyrisitingarliga ábyrgdin liggur hjá býararkitektinum. Eftirfylgjandi fyrispurningar og viðmerkingar um innihaldið í Arkitekturpolitikkinum verða beind til býararkitektin at svara.

Eins og við kommunuæltanini hevur býráðið skyldu til at taka atlit arkitekturpolitikkin tá politiskar avgerðir verða tiknar.

Um tørvur er á politiskum metingum av innihaldinum, kósabroytingum, ella tá avgerðir skulu takast millum ymisk áhugamál, sum stríða móti hvørjum øðrum, skal Býararkitekturin og býarskipanardeildin koma við einum tilmæli.

Býararkitekturin, er sostatt fyrisitingarligur ábyrgdari av arkitekturpolitikkinum og av miðlaátøkunum kring verkætlanina. Í sambandi við skrivingina av Arkitekturpolitikkinum, setur Býarkitekturin ein fakligan verkætlanarbólk á deild sínari (Býarskipanardeildini) at arbeiða við verkætlanini dagliga, og at leiða hana á mál.

**Skjøl**
*Uppskot um arbeiðssetning - Arkitekturpolitikkur fyri TK 28feb2025*, j. Nr. 25/0368-2
*Ætlað verkætlanartilgond - Arkitekturpolitikkur 28feb2025*, j.nr. Nr. 25/0368-3
*kostnaðarmeting Arkitekturpolitikkur dagf28feb2025*, j.nr. Nr. 25/0368-4
*Upprunalig málslýsing Arkitekturpolitikkur fyri Tórshavnar Kommunu*, j.nr. 25/03681-5

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

Hetta málið er eitt framhald av málinum "Arkitekturpolitikkur fyri Tórshavnar Kommunu" – j.nr. 22/05054

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | x | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | x | x | x | x |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | x | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☒
Eyka játtan ☐
Lokað verkætlan ☐

| **Játtast av:** | | |
|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** |
| 6275 | LK62999 | Fríðkan av býnum |

| **Játtast á:** | | | |
|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** |
| 6275 | | | Arkitekturpolitikkur |

| **Upphædd** |
|---|
| 500.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** |
|---|

| | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | 500.000 |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | 2025 |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | - |

**Tilmæli:**
Tekniski stjóri og býararkitekturin mæla til, at samtykkja viðhefta arbeiðssetning sum leist til framhaldandi tilgongdina, og at játta 500.000 kr av konto 6275, LK62999, Fríðkan av býnum á nýggja verkætlan við heitinum Arkitekturpolitikkur, og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 10. mars 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Arbeiðið verður mett sum umsitingarligt arbeiðið, og tískil skal játtanin somuleiðis játtast sum eykajáttan til fyrisitingina.

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☐
Eyka játtan ☒
Lokað verkætlan ☐

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| 6275 | LK62999 | Fríðkan av býnum | 1313 | Sak | Arkitekturpolitikkur | | 500.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | 500.000 |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | 2025 |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | - |

Tilmæli:
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, at samtykkja viðhefta arbeiðssetning sum leist til framhaldandi tilgongdina, og at játta sum eykajáttan 500.000 kr av konto 6275, LK62999, Fríðkan av býnum á kt. 1313 við undirliggjandi sak, Arkitekturpolitikkur, og at beina málið tvær ferðir í býráðið umvegis fíggjarnevndina

**Fíggjarnevndin 19. mars 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið sum eykajáttanarmál, ið tørvar tvær viðgerðir.

**Býráðsfundur 27. mars 2025:** Einmælt samtykt.

# 84/25 Gøtan fram við Sandá

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 10.03.2025 | 42/25 | 25/03741-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 19.03.2025 | 49/25 | 25/03741-1 |
| 3 Býráðsfundur | 27.03.2025 | 84/25 | 25/03741-1 |

**Upprunin til málið**
Gøtan fram við Sandá hevur verið í gongd yvir fleiri tey seinastu árini. Ynski er framvegis at "Gøtan kring Havnina" verður til veruleika, og er gøtan framvið Sandá ein týðandi partur av hesum málinum.

Gøtan er, sum heitið eisini ber boð um, fram við Sandá, og hevur verið neyðugt fyri at kunna fremja gøtuna, at flyta hana so nógv sum gjørligt frá áarbakkanum. Tískil gongur gøtan inn yvir fleiri privatar ognir, sum matrikulerar avtalur mugu gerast fyri.

Yvirskipaða játtanin til gøtuna er viðgjørd í journal nr 18/00992 Lendisgøtur. Hendan játtanin fevnir somuleiðis um avleiddar avtalur, sum krevjast fyri at fremja gøtuna.
Mál nr. 18/00992, Lendisgøtur, viðgerð játtanir til allar lendisgøtur, sum verða raðfestar.

Hetta málið er ætlað til ymiskt samskifti viðvíkjandi viðurskiftum, sum knýta seg til gerð av hesi gøtuni.

**Lýsing av málinum**
Farið varð undir at gera gøtuna eystan fyri Sandá í 2021.
Fyrsti partur av gøtuni varð handaður kommununi í 2023.
Játtan at gera gøtuna lidna varð samtykt í desember 2023, herundir eisini at keypa lendi, hegna og planta fram við traðunum.
Stígur kom í, orsakað av manglandi avkláring við eigarar av privatu traðunum.

**Lógir, ásetingar o.a.**
-

**Upplýsingar frá umsitingini**
Stjórnardeildin hevur arbeitt við at fáa avtalu í lag við eigaran av matr nr 1130, soleiðis at heimild fæst at gera arbeiðið á og fram við teirra ogn.

Semja er nú gjørd við eigaran av matr nr 1130, sum er soljóðandi:
Tórshavnar kommuna:

- Keypir 446 fermetrar av lendi fyri 137,-kr/m$^2$
- Leggur vatnveiting inn á trøðna hjá seljaranum.
- Tryggjar, at almenna høvuðskloakkin, ið liggur ígjøgnum matr. nr. 1130, Tórshavn verður gjørd í lagi.
- Setir upp nýtt hegn og portur, tekur sær av og rindar marknaskipan og tinglýsing.
- Leggur dragirør og elveiting í gøtuna, soleiðis at seljari fær elveiting til trøðna.
- Setir elskáp upp og tryggjar íbinding til skipanina hjá SEV.

Samlaður kostnaður fyri hesa semjuna íroknað keyp av lendi, er mett til kr. 161.102.
Sí j.nr ***Jnr 25/03741-6*** *Semjuskjal matr. nr. 1130, Torshavn*
Játtan til hesa avtalu er tøk undir L62019, Lendisgøtur.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið:**
**Jnr 16/04518** Gøtan kring Havnina

**Jnr 18/00992** Lendisgøtur
**Jnr 21/00929** Lendisgøta við Sandá, eystanfyri

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
-

**Skjøl:**
**Jnr 18/00992-70** Samtykt Býráðsfundur, 14.12.2023 Lendisgøtur
**Jnr 25/03741-6** Semjuskjal matr. nr. 1130, Torshavn

**Tilmæli:**
Kommunustjórin, tekniski stjóri, býararkitekturin og leiðarin á stjórnarskrivstovuni mæla til:
- At tikið verður undir við avtalaðu semjuni við eigaran av matr.nr. 1130 í Tórshavn, og at umsitingin fær heimild at avgreiða átøkini hesum viðvíkjandi.
- At beina málið viðv. avtaluni um semju í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 10. mars 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 19. mars 2025:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 27. mars 2025:** Einmælt samtykt.

# 85/25 Útstykking til sethús við Stórutjørn - 22/02943

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 10.02.2025 | 32/25 | 25/00581-2 |
| 2 Tekniska nevnd | 10.02.2025 | 6/25 | 25/00581-2 |
| 3 Fíggjarnevndin | 26.02.2025 | 25/25 | 25/00581-2 |
| 4 Býráðsfundur | 27.02.2025 | 57/25 | 25/00581-2 |
| 5 Býráðsfundur | 27.03.2025 | 85/25 | 25/00581-2 |

**Upprunin til málið**
Málið er framhald av málinum 22/02943 Útstykking til sethús við Stórutjørn

**Lýsing av málinum**
Viðgerðin av málinum higartil er lýst í málslýsingini fyri mál nr. 22/02943.
Í stuttum snýr málið seg um, at politiskt var ynski at seta gongd á bústaðarbyggingina við Stórutjørn.

Meðan arbeitt varð við at gera klárt til at bjóða arbeiðið at gera útstykking á økinum út, gav P/F Articon kommununi eitt tilboð upp á at útstykkja býlingarnar 1 og 4 úr heildarætlanini. Tilboðið var skipað sum heildararbeiðstøka, har kommunan innan fyri rammurnar av tilboðnum kundi gera tillagingar. Sáttmáli varð gjørdur áljóðandi kr. 79.320.642,13, íroknað mvg við afturbering til kommununa.

<u>Spillvatnsoptión</u>
Henda útstykkingin er so statt sambært samtykt sett í verk sum heildarverkætlan við P/F Articon sum heildarveitara. Afturat tilboðnum hevur P/F Articon givið eina optión upp á at stoypa reinsiverk og leggja kloakkering millum útstykkingarnar við Stórutjørn til reinsiverkið og millum reinsiverkið og útlát út á sjógv eystan fyri Sandvíkar. Kostnaðurin fyri hesa optión er kr. 7.078.911,56 íroknað mvg við afturbering.

Henda optiónin kann síggjast sum verkætlan fyri seg, tí at reinsiverk og kloakkering skal eisini gerast og bindast í høllina við Tjarnir, vinnuútstykkingina á Ovara Hjalla, umframt framtíðar útstykkingar við Stórutjørn (býlingur 2, 3, 5 og 6), soleiðis at økið verður virkið við nøktandi leiðingum. Sáttmáli varð ikki gjørdur um hesa optión í fyrstu atløgu.

Nú høllin við Tjarnir er um at verða liðug og vinnuútstykkingin á Ovara Hjalla verður liðug í summar, gerst tað alt meiri átroðkandi at fáa eina spillvatnsloysn til hesar útbyggingarnar, og tað er somuleiðis av hesi grund, at neyðugt er at taka støðu til spillvatnsætlanina fyri samlaða økið. Somuleiðis er neyðugt at fáa eina spillvatnloysn til útstykkingina við Stórutjørn, sum ikki kann leiðast í verandi spillvatnsloysnir í økinum, vegna ov smáar dimensiónir á leiðingunum og longu staðfestar avbjóðingar við verandi nýtslu.

Mett verður, at Tórshavnar kommuna eigur at fara undir at aktivera optiónina fyri spillvatnsloysnina fyri at tryggja, at høllin við Tjarnir og vinnustykkini á Ovara Hjalla kunnu takast í nýtslu, beinanvegin, sum tey eru liðug.

<u>Byggiharraútreiðslur og óvæntað</u>
Í upprunamálinum er einans játtaður peningur fyri sáttmálan við P/F Articon um heildararbeiðstøku. Nú arbeiðið er farið í gongd er tørvur á, at peningur eisini verður játtaður til byggiharraútreiðslur í sambandi við verkætlanararbeiðið. Her er talan um viðurskifti, so sum verkætlanarleiðsla, uttanhýsis eftirlit, óvæntaðar útreiðslur o.l. Mett verður, at 5% av sáttmálaupphæddini eiga at verða játtaðar til óvæntaðar útreiðslur og 2,5% til verkætlanarleiðslu og uttanhýsis eftirlit. Tilsamans 7,5% ella kr. 6.480.000,-.

Keyp av lendi:
Tórshavnar kommuna hevur fingið tilsøgn frá Búnaðarstovuni at keypa lendi til víddar 74.000 m² til útstykkingina í býlingi 1 og 4, sí tilsøgn og kortskjal j.nr. 25/00581-3. Keypspeningurin áljóðandi kr. 8.424.500,00 skal játtast sum útlegg av verkætlanini.

Játtanaryvirlit
Í talvuni niðanfyri kann síggjast yvirlit yvir verandi játtan, og játtanirnar, sum biðið verður um afturat.

| Dato | Játtan | Upphædd |
|---|---|---|
| 20.06.2024 | Sáttmáli við P/F Articon um heildararbeiðstøku v. komm. mvg | 79.320.642,13 |
| - | Optión um spillvatnsleiðing v. komm. mvg. | 7.078.911,56 |
| - | Byggiharraútreiðslur og óvæntað 7% | 6.480.000,00 |
| - | Keyp av lendi | 8.424.500,00 |
| | **Tilsamans** | **101.304.053,69** |

Framhaldandi tilgongdin:
Fram til í dag hevur verið arbeitt við býlingi 1 og 4, sum í heildarætlanini verða nevnd oyggj 1 og oyggj 4.

Í málinum, Skipan av Stórutjørn (mál nr. 18/03468), varð samtykt á býráðsfundi 28.09.2023, at heildarætlanin fyri Stórutjørn skuldi nýtast sum vegleiðandi amboð fyri víðari menningina av økinum.

Arbeitt verður framhaldandi við at skipa býlingarnar niður í smálutir, soleiðis at tilgongdin verður gjørd rætt og gott.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Almenna byggisamtyktin fyri Tórshavnar kommunu er galdandi fyri økið, og skal serstøk byggisamtykt gerast, tá prosjekteringin er liðug.

**Upplýsingar frá umsitingini**
-

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
Mál nr. 18/03468 Skipan av Stórutjøn er yvirskipaða málið fyri økið. 28. apríl 2022 var málið seinast fyri býráðið, har tað varð endaliga samtykt, at:

- Játta fígging til keyp av lendinum til Innkomuvegin og komandi vinnuútstykkingina Ovari hjalli.
- at heimila umsitingini at gera avtalu við Búnaðarstovuna um at keypa lendi í stigum til framtíðar útstykkingar burtur av matr. nr. 1æf og 139ed. So hvørt, sum tørvur er á fígging, verður málið lagt fyri aftur avvarðandi nevndir til støðutakan.
- at heimila umsitingini at samráðast við og gera avtalu við festaran um avlopstilfar og um at framtíðartryggja møguleikarnar at reka landbúnaðarvirksemi á festinum. Avtalan verður at leggja fyri aftur og góðkenna av avvarðandi nevndum.

Mál nr. 22/02943 Útstykking til sethús við Stórutjørn (arkiverað upprunamál)

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
-

**Skjøl**
J.nr. 22/02943-4 VS: Útstykking við stórutjørn – sjálvboðið tilboð

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | **Fyri Tórshavnar kommunu** | **Fyri ávís økir í kommununi** | **Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir** | **Fyri vinnuna** |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/læ ttar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☐
Eykajáttan ☒
Loka verkætlan ☐

| **Játtast av:** | | |
|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** |
| | | |

| **Játtast á:** | | | |
|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** |
| 6475 | L64021 | Útstykking við Stórutjørn, B1, B4 | |

| **Upphædd** |
|---|
| 21.983.411,56 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | 101.304.053,69 |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | 2024/2026 |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | 500.000 |

**Tilmæli:**
Kommunustjórin, leiðarin á Stjórnarskrivstovuni, býararkitekturin og býarverkfrøðingurin mæla til at heimila umsitingini at:

- gera sáttmála við arbeiðstakara um loysn fyri spillvatn frá Stórutjørn við støði í optiónini áljóðandi kr. 7.079.000,-, sum verður fíggjað sum útlegg á verkætlan L64021 Útstykking við Stórutjørn, B1, B4, kt, 6475 Byggibúning bústaðir.
- at játtað verða 7,5% av arbeiðstøkusáttmálanum svarandi til kr. 6.480.000,- til byggiharraútreiðslur í sambandi við verkætlanarleiðslu, uttanhýsis eftirlit, óvæntaðar útreiðslur og líknandi í sambandi við heildararbeiðstøkuna,-, sum verður fíggjað sum útlegg á verkætlan L64021 Útstykking við Stórutjørn, B1, B4, kt, 6475 Byggibúning bústaðir.
- at játtaðar verða kr. 8.424.500,- til útreiðslur í sambandi við keyp av lendi til verkætlanina.
- at málið verður beint í býráðið til tvær viðgerðir umvegis teknisku nevnd og fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 10. februar 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum, men at arbeiðið við at gera kloakkina frá reinsiverkinum og út á sjógv skal bjóðast út.

**Tekniska nevnd 10. februar 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti**

Við hesi umbøn um eykajáttan verður biðið um at hækka upprunaliga útleggið í jnr. 22/02943 á kr. 79.320.642,13 við kr. 21.983.411,56, soleiðis at samlaða útleggið til útstykkingina við Stórutjørn verður 101.304.053,69.

**Fíggjarnevndin 26. februar 2025:** Ein meiriluti, Elsa Berg, Kristianna Winther Poulsen og Guttormur í Skála, tekur undir við byggi- og býarskipanarnevndini og teknisku nevnd við teirri broyting, at arbeiðið at gera kloakk og reinsiverk verður boðið út. Játtaðar verða kr. 6.480.000,00 til byggiharraútreiðslur og óvæntað 7% og kr. 8.424.500,00 til keyp av lendi sum eykajáttan, ið tørvar tvær viðgerðir í býráðnum.

Høgni Vilhelmsen og Tróndur Sigurðsson atkvøða blankt.

**Býráðsfundur 27. februar 2025:** Atkvøtt varð um tilmælið frá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við fyrstu viðgerð við 11 atkvøðum fyri, ongari atkvøðu ímót og tveimum blonkum atkvøðum.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Kristianna Winther Poulsen, Bergur Robert Dam Jensen, Guttormur í Skála, Annfinn Brekkstein, Høgni Vilhelmsen og Birgir Nielsen.

Blankt atkvøddu: Tróndur Sigurðsson og Kári Johansen

Uppskotið beint víðari til aðru viðgerð.

**Býráðsfundur 27. mars 2025:** Atkvøtt varð við aðru viðgerð um tilmælið frá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 11 atkvøðum fyri, ongari atkvøðu ímóti og tveimum blonkum atkvøðum.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Kristianna Winther Poulsen, Bergur Robert Dam Jensen, Guttormur í Skála, Sunnvá Dahl Høgfeldt, Høgni Vilhelmsen og Birgir Nielsen.

Blankt atkvøddu: Tróndur Sigurðsson og Kári Johansen.

# 86/25 Orkuátøk á Lágargarði

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 10.02.2025 | 11/25 | 25/02841-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 26.02.2025 | 29/25 | 25/02841-1 |
| 3 Býráðsfundur | 27.02.2025 | 58/25 | 25/02841-1 |
| 4 Býráðsfundur | 27.03.2025 | 86/25 | 25/02841-1 |

**Ískoyti**
Vísandi til mál 17/03154 Orkupolitikkur

Umsitingin hevur bjóðað út og fingið tilboð inn. Tilboðið umfatar 3 stk. ventilatiónsannlegg við nýggjum ventilatiónsrørum til tær 3 lonirnar. Hetta fer at betra góðskuna av inniluftini og endurvinna avkastluftina betur og harvið minka um orkutørvin.

Kostnaðarmeting á 3.500.000 kr er gjørd út frá innkomnu tilboðum. Vit fingu játtað 2.000.000 kr í 2024 fyri at byrja verkætlana, hettar er tó ov lítið til hesa verkætlan, so tað restar 1.500.000 kr.

**Skjøl**
17/03154-1 Orkupolitikkur
17/03154-42 VS: Lágargarður - upprit um orkuátøk og umvælingar
25/02841-3 Ventilatiónsskipan
25/02841-3 DA-Denmark-Exhausto-VEX150-horisontal-udforelse-VEX150H

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☒
Eykajáttan ☐
Loka verkætlan ☐

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Deild | Verk-ætlan | Navn | Deild | Verk-ætlan | Navn | Nýggj verkætlan | Upphædd |
| 6177 | LK61705 | Orkupolitikkur | 6177 | L61712 | Orkuátøk á Lágargarði | | 1.500.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli:**
Kommunustjórin, leiðarin á umhvørvisdeildini og leiðarin á bygningsdeildini mæla til at flyta kr. 1.500.000 av konto 6177 Umsiting og røkt av bygningum, løgukarmi Orkuátøk, LK61705, Orkupolitikkur, til verkætlanina L61712 Orkuátøk á Lágargarði, og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 10. februar 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Á fundinum í Náttúru- og umhvørvisnevndini 10. februar 2025, varð spurt eftir hvat slar av anleggum ætlanin er at brúka og hvat virkningsgradurin er.

Talan er um 3 nýggj anlegg. Tey nýggju anleggini hava ein virkningsgrad á 86%, í mun til tey gomlu, sum høvdu 60%.

Útrokning vísir, at vi kontinuerligari drift er sparingin uml. 40% í mun til verandi skipan; hetta svarar til uml. Kr. 45.000,- pr. anlegg pr. ár.

**Viðheft** eru 2 nýggj skjøl til kunningar, tað er j.nr. 25/02841-3:
- Ventilatiónsskipan
- DA-Denmark-Exhausto-VEX150-horisontal-udforelse-VEX150H

**Fíggjarnevndin 26. februar 2025:** Samtykt at taka undir við náttúru- og umhvørvisnevndini við teirri broyting, at kr. 500.000 verða játtaðar av konto 6177 Umsiting og røkt av bygningum, løgukarmi Orkuátøk LK61705, og kr. 1.000.000 játtaðar av løgukarmi LK27016, Ellisheim, dagføring og játta á verkætlanina L61712 Orkuátøk á Lágargarði. Málið beint í býráðið.

Tróndur Sigurðsson luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 27. februar 2025:** Tróndur Sigurðsson legði fram broytingaruppskot um at játta kr. kr. 1.500.000 av konto 6177 Umsiting og røkt av bygningum, løgukarmi Orkuátøk, LK61705, Orkupolitikkur, til verkætlanina L61712 Orkuátøk á Lágargarði.

Atkvøtt varð um broytingaruppskotið, ið fall við fimm atkvøðum fyri, átta atkvøðum ímóti og ongari blankari atkvøðu:

Fyri atkvøddu: Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kári Johansen, Høgni Vilhelmsen, Birgir Nielsen.

Ímóti atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Kristianna Winther Poulsen, Bergur Robert Dam Jensen og Guttormur í Skála.

Síðani varð atkvøtt um tilmælið frá fíggjarnevndini, ið varð samtykt við átta atkvøðum fyri, fimm atkvøðum ímóti og ongari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Kristianna Winther Poulsen, Bergur Robert Dam Jensen, Guttormur í Skála

Ímóti atkvøddu: Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kári Johansen, Høgni Vilhelmsen, Birgir Nielsen.

**Býráðsfundur 27. mars 2025:** Atkvøtt varð við aðru viðgerð, og varð málið samtykt við átta atkvøðum fyri, fýra atkvøðum ímóti og einari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Kristianna Winther Poulsen, Bergur Robert Dam Jensen og Guttormur í Skála,.

Ímóti atkvøddu: Tróndur Sigurðsson, Kári Johansen, Høgni Vilhelmsen og Birgir Nielsen.

Blankt atkvøddu: Sunnvá Dahl Høgfeldt.

# 87/25 Dagføring av burturkastgjøldum 2025

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 10.03.2025 | 14/25 | 25/03368-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 19.03.2025 | 44/25 | 25/03368-1 |
| 3 Býráðsfundur | 27.03.2025 | 87/25 | 25/03368-1 |

**Upprunin til málið**
Kommunala Brennistøðin stendur fyri umfatandi umvælingum og dagføringum, soleiðis at hon kann nøkta tann tørv, sum er í dag og komandi árini.

Alt burturkastøkið skal sum heild mennast við meira skiljing, soleiðis at vit koma at endurnýta og endurvinna meira og at brenna og tyrva minni.

Eisini skulu vit rokna við herdum krøvum frá myndugleikum.

Alt hetta kemur at gera, at kommunan framyvir skal seta væl meira pening av til rakstur av burturkastøkinum, og ein partur av fíggingini kann koma frá at dagføra burturkastgjøld og burturkastbólkar.

**Lýsing av málinum**
Burturkastgjøldini hjá Kommunalu Brennistøðini eru ikki dagførd síðani 2012, og tí er neyðugt at gjøldini vera regulerað soleiðis, at tey fylgja almenna prísstøðinum í restini av samfelagnum.

Prísstøðið í samfelagnum er, sambært Hagstovuni, hækkað 18,39 % frá 2012 til 2024, og harafturat er kostnaðarstøðið sum heild hækkað nógv seinastu árini – so sum lønir og onnur føst gjøld, og verður tískil ein samlað príshækkan uppá uml. 25 % av mestsum øllum gjøldum viðmælt, sí skjal 25/03368-2.

Gjøldini eru ásett soleiðis, at tey samsvara nøkulunda við gjøldini hjá IRF. Talan er um gjøld, sum vinnan skal rinda fyri at koma av við sítt burturkast.

Um vit taka útgangsstøði í nøgdunum frá 2024, og prísstøðið á burturkastgjøldunum verður hækkað við uml. 25 %, sum ætlanin er – so kemur tað at skapa eina árliga eykainntøku til Kommunalu Brennistøðina uppá uml. kr. 2,25 mió.:

| | |
|---|---|
| Hækkan av inntøku | 2.248.792 |
| | |
| Brennistøðin | 1.182.113 |
| Moldplássið | 315.405 |
| Endurnýtslan | 751.275 |

Broytingin í burturkastgjøldunum kemur at ávirka vinnuna, soleiðis at hesi koma at gjalda meira fyri at sleppa av við sítt burturkast.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Kunngerð 147 frá 18. okt 1995 um burturkast, har tað sambært § 16 sigur, at fyri handfaring av burturkasti kann Kommunustýrið áseta eitt gjald eftir góðkenning frá Føroya Landstýri.

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

2012-0304 Reglugerð um skráseting og gjald fyri gjaldskyldugt burturkast
2012-0367 Ásetan av burturkastgjøldum
19/04775 Dagføring av burturkastgjøldum

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**
25/03368-2 Uppskot til dagføring av burturkastgjøldum og -bólkum
25/03368-3 yvirlit yvir hvat dagføringin kemur at merkja fíggjarligt

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | x | | | x |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | x | | | x |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, leiðarin á Umhvørvisdeildini og leiðarin á Brennistøðini mæla til, at nevndin tekur undir við at dagføra burturkastgjøldini hjá Kommunalu Brennistøðini, sambært skjali 25/03368-2 og beina málið í fíggjarnevndina og býráðið.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 10. mars 2025:** Ein meiriluti, Kristianna Winther Poulsen, Guttormur í Skála, Annita á Fríðriksmørk, tekur undir við tilmælinum.

Annfinn Brekkstein tekur ikki undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 19. mars 2025:** Ein meiriluti, Elsa Berg, Kristianna Winther Poulsen, Høgni Vilhelmsen og Guttormur í Skála, tekur undir við meirilutanum í náttúru- og umhvørvisnevndini við teirri broyting, at prísirnir hækka við prístalsjavningini á 18 % nú, og at prísirnir fyri komandi ár verða viðgjørdir í sambandi við viðgerðina av fíggjarætlanini fyri 2026. Màlið beint í býráðið.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson, tekur ikki undir við uppskotinum til dagføring av prísunum við teirri viðmerking, at prísirnir hækka alt ov nógv.

**Býráðsfundur 27. mars 2025:** Atkvøtt varð um tilmælið frá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við átta atkvøðum fyri, fimm atkvøðum ímóti og ongari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Kristianna Winther Poulsen, Bergur Robert Dam Jensen og Guttormur í Skála.

Ímóti atkvøddu: Sunnvá Dahl Høgfeldt, Tróndur Sigurðsson, Kári Johansen, Høgni Vilhelmsen, Birgir Nielsen.

# 8/25 Gjaldskipan til bussleiðina

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 19.03.2025 | 50/25 | 25/03502-1 |
| 2 Býráðsfundur | 27.03.2025 | 88/25 | 25/03502-1 |

**Upprunin til málið**
Politiskt er ynski um at gera eina skipan við borgarakorti til borgarar, sum nýta skattafíggjaðar tænastur hjá kommununi; soleiðis, at tey, sum ikki eru borgarar í Tórshavnar kommunu, kunnu gjalda fyri hesar tænastur.

**Lýsing av málinum**
Í dag er einki gjald fyri nýtslu av kommunalu bussleiðini og er hendan sostatt bert skattafíggja. Tað hevur verið víst á at alsamt meira trýst er bussleiðina av ferðandi sum koma til Føroyar, ið nýta hesa tænastu ókeypis, og at tað hevur avleiðingar fyri tænastustøði hjá borgarum í kommununi. Eisini hevur verið víst á at tað er kappingaravlagandi fyri taksavinnuna at bussleiðin er ókeypis fyri tey ferðandi.

Bussleiðin er boðin út, og verandi sáttmáli við Sp/f Gundurs Bussar er galdandi frá 1. januar 2023 til 31. desember 2030. Endamálið er at fáa so nógv fólk sum gjørligt at koyra við bussi. Tekniska deild hevur dagliga eftirlitið við bussleiðini.

Ynski hevur verið at kanna møguleikar fyri einari loysn har vitjandi í kommununi kunnu gjalda fyri ferðaseðil í bussleiðini. Arbeitt verður við eini talgildari gjaldsskipan til ferðafólk, hendan umfatar eisini eitt borgarakort.

Loysnin byggir uppá tveir sjálvstøðugar partar:

Eitt talgilt borgarakort til borgarar í Tórshavnar Kommunu. Ætlanin er at nýta núverandi Samleikakort í Skjáttuni. Samleikakortið skal greitt vísa at borgarin er skrásettur í Tórshavnar Kommunu. Bert fólk ið eru eldri enn 13 ár kunnu fáa samleikakort frá Talgildu Føroyum.

Eina app/webapp, har borgarar uttanfyri Tórshavnar Kommunu hava møguleika til at keypa ferðaseðlar til bussleiðina. Loysnin skal vera so einføld sum gjørligt, og møguligt verður bert at keypa talgildan ferðaseðil gjøgnum skipanina. Skipanin skal hava samband við bókhaldskipanina hjá kommununi fyri at minka um umsitingin av gjøldunum. Brúkarin fær eina kvittan sum vísur gildistíð av ferðaseðlanum.

Brúkaragjøld skulu samtykkjast í býráðnum. Støða skal takast til hvør skal gjalda ferðaseðil, kostnaðurin av hesum og hvussu hettar skal skipast. Sí uppskot í fylgiskjal nr. 1

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl** 24/03367 Gjaldskipan til bussleiðina

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Tilmæli:**
Fyrisitingarstjórin og leiðarin á KT-deildini mæla til at umrøða málið.

**Fíggjarnevndin 20. juni 2024:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**
Arbeiði at menna eina nýggja web-app til gjalding í býbussinum er liðugt og er loysnin klár at seta í verk. Sí skjal nr.
Ferðafólk skulu keypa ferðaseðil umvegis appina. Skipanin er sett upp sum ein nethandil og hevur samband við bókhaldskipanina hjá kommununi fyri at minka um umsitingina. Inntøkur og útreiðslur av skipanini verða bókaðar á bussleiðina.
Nethandilin fæst við føroyskum, donskum og enskum máli. Tann ferðandi kann velja ímillum tríggjar ferðaseðlar.

Brúkaragjøld skulu samtykkjast í býráðnum. Skotið verður upp, at ferðafólk, ið ikki eru búsitandi í Føroyum, skulu gjalda fylgjandi gjøld fyri ferðaseðlar í býbussunum.
- 24-tíma ferðaseðil – 50 kr.
- 3-dagar ferðaseðil – 120 kr.
- 7-dagar ferðaseðil – 210 kr.

Børn undir 13 ár koyra ókeypis.

Um prísásetingin verður góðkend, kann íverksetan av skipanini byrja.

**Tilmæli:**
Fyrisitingarstjórin, KT-leiðarin og leiðarin á teknisku deild mæla til, at fíggjarnevndin tekur undir við uppskotinum um brúkargjøld í bussleiðini og beinir málið í býráðið.

**Fíggjarnevndin 09. oktober 2024:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Kári Johansen, Tróndur Sigurðsson og Birgir Nielsen, mælir til at taka undir við tilmælinum við teirri broyting, at gjøldini verða 100 kr., 200 kr. og 500 kr. fyri ávikavist ein 24-tíma ferðaseðil, 3-dagar ferðaseðil og 7-dagar ferðaseðil. Málið beint í býráðið.

Ein minniluti, Jákup Dam, tekur undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 24. oktober 2024:** Atkvøtt varð um broytingaruppskot frá Heðini Mortensen um at taka undir við tilmælinum frá meirilutanum í fíggjarnevndini við terri broyting, at ein 7-dagar ferðaseðil skal kosta 400 kr.

Broytingaruppskotið samtykt við níggju atkvøðum fyri, fýra blonkum atkvøðum og ongari atkvøðu ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kristianna Winther Poulsen, Kári Johansen, Súna Mørk, Bjørg Dam, Birgir Nielsen og Súsanna Olsen.

Blankt atkvøddu: Elsa Berg, Jákup Dam, Gunvør Balle og Annika Olsen.

**Ískoyti:**
Býráðið samtykti í fjør at seta í verk skipan, har útlendsk ferðafólk rinda fyri at nýta bussleiðina í Tórshavnar kommunu, og at føroyingar kunnu koyra ókeypis.

Fleiri avbjóðingar eru í løtuni við at íverkseta hesa skipan.

Spurningurin er settur við, um munur kann gerast á borgarum í Føroyum og útlendingum á tann hátt, sum býráðið hevur samtykt. Heimild er tó fyri, at bert borgarar í Tórshavnar kommunu skulu ferðast ókeypis við bussleiðini, tí hesir frammanundan hava goldið fyri bussleiðina gjøgnum kommunuskattin. Um gjald skal ásetast, skal hetta vera galdandi fyri øll, sum ikki eru borgarar í kommununi. sí skjal nr. 25/03502-3 Upprit um bussleiðina

Tórshavnar kommuna hevur kunnað ferðavinnuaktørar um nýggju gjaldsskipanina. Ynski er sett fram um at fáa boð um slíka broyting í góðari tíð. Orsøkin er, at ferðavinnuaktørar longu hava selt ferðapakkar til í ár, har tey keypandi eru kunnaði um, at bussleiðin er ókeypis.

Eisini hevur Visit Tórshavn víst á møguleikan at knýta gjald til bussleiðina í eitt sonevnt “City Card”,sum Visit Tórshavn hevur ment, men ikki sett í verk enn. Nógv ferðafólk vitja frammanundan Kunningarstovuna í Steinatúni. Um gjaldsskipanin verður sett í verk seinni í ár, er møguligt at kanna møguleikan at knýta gjaldsskipanina til bussleiðina í eitt City Card.

Ynski er at betra bussleiðina m.a við fleri túrum á kvøldi og til bygdirnar. Ein heildarætlan eigur tí at vera gjørd fyri bussleiðina og ferðsluna í býnum, sum eisini tekur atlit til vinnu/ferðavinnu og umhvørvispoitikkin hjá kommununi.

**Tilmæli**
Fyrisitingarstjórin, tekniski stjórin og KT-leiðarin mæla fíggjarnevndini at taka til eftirtektar, at neyðugt er at endurskoða samtyktina frá 24. oktober í fjør. Mælt verður til, at tað verður gjørd ein heildarætlan fyri bussleiðina, sum tekur hædd fyri vinnu/ferðavinnu og umhvørvispolitikkinum hjá kommununi, og at ein gjaldsskipan ikki kemur í gildi fyrr enn hetta er gjørt. Væntandi verður klárt at leggja málið aftur fyri nevnd í heyst 2025.

**Fíggjarnevndin 19. mars 2025:** Ein meiriluti, Elsa Berg, Kristianna Winther Poulsen og Guttormur í Skála, tekur undir við tilmælinum og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson og Høgni Vilhelmsen, tekur ikki undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 27. mars 2025:** Atkvøtt varð um tilmælið frá fíggjarnevndini, ið varð samtykt við átta atkvøðum fyri, fimm atkvøðum ímóti og ongari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Kristianna Winther Poulsen, Bergur Robert Dam Jensen og Guttormur í Skála.

Ímóti atkvøddu: Sunnvá Dahl Høgfeldt, Tróndur Sigurðsson, Kári Johansen, Høgni Vilhelmsen, Birgir Nielsen.

# 89/25 Framflytingar fyri roknskaparárið 2024

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 19.03.2025 | 57/25 | 25/03985-1 |
| 2 Býráðsfundur | 27.03.2025 | 89/25 | 25/03985-1 |

**Upprunin til málið**
Sambært játtanarreglunum hjá Tórshavnar kommunu verða meir- og minninýtslur fluttar fram til komandi ár. Framflytingar skulu játtast sum eykajáttan í býráðnum, tvs. Skulu hava tvær viðgerðir.

Meirnýtsla, sum í mesta lagi kann vera 5% av nettojáttanini, verður flutt til næsta ár. Meirnýtsla skal vera burtur innan trý ár.

Minninýtsla, sum í mesta lagi kann vera 10% av nettojáttanini, verður flutt til næsta ár. Um serlig viðurskifti gera seg galdandi, og ynski er at flyta meira enn 10% til árið eftir, kann ein umbøn um hetta sendast avvarðandi fyrisitingarstjóra.

**Lýsing av málinum**
Ársroknskapurin fyri 2024 er gjørdur upp, og gjørt er eitt yvirlit yvir rakstrar- og íløgujáttanir at flyta fram til 2025.

Samlaða framflytingin íroknað Tórshavnar Havn er fyri rakstur 3,4 mió. kr. netto og fyri íløgur 122,9 mió. kr., í alt 126,3 mió. kr., og er útgreinað soleiðis:

| | **Rakstur** | **Íløgur** |
|---|---|---|
| TK | -2,8 mió | 79,5 mió |
| TH | 6,2 mió | 43,4 mió |
| **Íalt** | **3,4 mió** | **122,9 mió** |

Samlaða meirnýtslan á rakstrarsíðuni fyri Tórshavnar kommunu frároknað Tórshavnar havn er 76,7 mió. kr. Á § 1,2 og 4 er talan um minninýtslu, í meðan tað á § 3,5,6 og 7 er talan um meirnýtslu.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | **Fyri Tórshavnar kommunu** | **Fyri ávís økir í kommununi** | **Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir** | **Fyri vinnuna** |
|---|---|---|---|---|

| | **Býráðsfundur**<br>27. mars 2025 | Blað nr.: 225<br><br>Forkvinnunnar merki: |
|---|---|---|

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei
**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

## Játtan:

Vanlig játtan ☐
Eyka játtan ☒
Lokað verkætlan ☐

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| Ymis kar | | Framflutt 2024 | Ymis kar | | Játtan 2025 | | 126,3 mió |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli:**
Stjórnin mælir til at játtað framflyting á 3,4 mió. kr. til rakstur og 122,9 mió. kr. til íløgur. Møguligar broytingar í framflytingini koma við til aðru viðgerð.

**Fíggjarnevndin 19. mars 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið sum eykajáttanarmál, ið tørvar tvær viðgerðir.

**Býráðsfundur 27. mars 2025:** Einmælt samtykt við fyrst viðgerð.

Málið beint víðari til aðru viðgerð.

| | Býráðsfundur<br>27. mars 2025 | Blað nr.: 226 |
|---|---|---|
| | | Forkvinnunnar merki: |

# 90/25 Góðkenning av mánaðarroknskapinum 2025

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 26.02.2025 | 38/25 | 25/00161-1 |
| 2 Býráðsfundur | 27.02.2025 | 64/25 | 25/00161-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 19.03.2025 | 58/25 | 25/00161-1 |
| 4 Býráðsfundur | 27.03.2025 | 90/25 | 25/00161-1 |

**Upprunin til málið**
Sambært kunngerð nr. 89 frá 15. oktober 2008 um roknskaparverk kommununnar o.t. §10 skulu kommunur innraportera roknskapardátur hvønn mánað til Fíggjarmálaráðið.

Sambært § 9 skal kommunustýrið góðkenna.

**Lýsing av málinum**

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri januar verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 26. februar 2025:** Framlagt.

Tróndur Sigurðsson luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 27. februar 2025:** Framlagt og góðkent.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri februar verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 19. mars 2025:** Framlagt.

**Býráðsfundur 27. mars 2025:** Framlagt.

# 91/25 Val av bygginevnd fyri nýtt røktarheim og við røktaríbúðum

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 09.01.2025 | 31/25 | 25/00217-1 |
| 2 Býráðsfundur | 27.03.2025 | 91/25 | 25/00217-1 |

**Málslýsing:**
Í bygginevndini sita í dag:
Kristianna Winther Poulsen, Súsanna Olsen, Eyðfríð L. Jacobsen, Birita Wardum, Johan Syderbø og Eyðna Justinussen.
Verkætlanarleiðari: Bárður Johannesen

**Tilmæli:**
Kommunustjórin mælir býráðnum til at velja 2 limir í bygginevndina sambært lutfalsvalháttinum.

**Býráðsfundur 09. januar 2025:** Samtykt at velja Kristionnu Winther Poulsen og Annfinn Brekkstein.

**Ískoyti:**
Annfinn Brekkstein hevur boðað frá, at hann tekur seg úr nevndini og tí skal nýggjur limur veljast í nevndina.

**Býráðsfundur 27. mars 2025:** Samtykt at velja Kára Johansen í bygginevndina.

# 92/25 Nýtt felagshús til FC Hoyvík og heildarætlan fyri økið - 23/05602

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | | | 25/00153-1 |
| 2 Býráðsfundur | 27.03.2025 | 92/25 | 25/00153-1 |

**Upprunin til málið**
Víst verður til ískoytissáttmálan millum TK og FC Hoyvík, har kommunan skal undir ítøkiligar fyrireikingar at byggja felagshús við Hoyvíksvøll.

**Lýsing av málinum**
Vísandi til mál nr. 18/00009 viðv. felagshúsi til FC Hoyvík, so endaði tað málið við samtykt um gera eina fyribils hølisloysn til fótbóltsfeløgini FC Hoyvík og Undrið FF. Síðani eru fyribilslonirnar settar upp, og fótbóltsfeløgini, FC Hoyvík og Undrið FF, hava lagt saman undir felagsheitinum FC Hoyvík.

Fyribils lonin bleiv bleiv gjørd í 2022, men hendan loysnin hevur víst seg at vera alt annað enn góð. Fyri tað fyrsta, so er Lonin alt ov lítil til tað alsamt vaksandi virksemið hjá FC Hoyvík, og fyri tað næsta, so ber lonin í stóran mun brá av at vera ein fyribilsloysn. Stórar avbjóðingar hava verið og eru í løtuni. M.a. er lonin illa farin av veðrinum, og stórar avbjóðingar er við tí byggitekniska partinum.

Í samb. við mál 21/01797 (Yvirtøka av ognini hjá FC Hoyvík á Gundadalsvegnum 8), bleiv tað samtykt, at TK keypir ognina hjá FC Hoyvík (fyrrverandi FRAM) fyri 636.000 kr.

Samstundis bleiv samtykt at gera ískoytissátmála, millum TK og FC Hoyvík, um at kommunan skal undir ítøkiligar fyrireikingar at byggja felagshús við Hoyvíksvøll innan 31. desember 2024.

Sbrt. ískoytissáttmálanum skal keypsupphæddin á 636.000 kr. brúkast til bygging av nýggjum felagshúsið, sbrt. vallarreglugerðini hjá FSF. Er TK ikki farið undir tær ítøkiligu fyrireikingarnar til at byggja felagshúsið, kann FC Hoyvík krevja at fáa upphæddina útgoldna í januar 2025.

FC Hoyvík hevur á fundi tann 2. mai 2024 boðað TK frá, hvørji ynskir felagið hevur í samband staðseting og tørv.

FC Hoyvík metir, at besta loysnin er at seta nýggja felagshúsið aftanfyri norðara málið. Við at staðseta húsið við norðara enda, fær TK eisini loyst avbjóðingina við, at grót ríður undan parkeringsplássinum hjá skúlanum og oman til vøllin.

Felagið metir, at tað gevur ikki meining at gera áskoðarapláss í hesum felagshúsinum, tí tað stendur aftanfyri annað málið. Heldur skulu áskoðaraplássini gerast á vestaru langsíðu mitt fyri.

FC Hoyvík hevur hugskotið, at húsið verður gjørt í trimum hæddum, har hædd er tikin fyri øllum teimum treytum sum FSF hevur í vallarreglugerðini. Ovasta hædd kundi partvíst verið brúkt til okkurt tilboð á skúla-ella barnagarðsøkinum.

FC Hoyvík boðaði frá, at felagið tulkar orðingina í § 2 í ískoytissáttmálanum “at kommuna er farin undir ítøkiligar fyrireikingar at byggja felagshúsið”, sum at TK setur upphædd av á fíggjarætlanini 2025 til endamálið. Harumframt vil felagið hava at vita hvat tíðarætlanin verður.

Eitt felagshús til FC Hoyvík hongur saman við heildarætlanini fyri bæði Karlamagnusarbreyt, skúlan við Løgmannabreyt og Hoyvík sum heild. Sostatt er felagshúsið hjá FC Hoyvík eisini bundin av teimum ætlanum, ið Býarskipanardeildin umsitur á økinum.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
21/01797 Yvirtøka av ognini hjá FC Hoyvík á Gundadalsvegnum 8
18/00009 Fótbóltsfelagið FC Hoyvík: Felagshús við Hoyvíksvøll

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**
23/05602-2: Undirskrivaður sáttmáli og ískoytissáttmáli - Mál 21/01794

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei
**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☐
Eyka játtan ☐
Lokað verkætlan ☐

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Deild | Verk-ætlan | Navn | Deild | Verk-ætlan | Navn | Nýggj verkætlan | Upphædd |
| | | | | | | | |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| Íløgujáttan | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til, at Mentamálanevndin viðgerð málið og beinir tað víðari til Byggi- og býarskipanarnevndina til støðutakan.

**Mentamálanevndin 15. mai 2024**: Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Fundur var við umboð fyri FC Hoyvík, har umboðini greiddu frá teirra sjónarmiðum viðv. at fáa staðsett eitt felagshús. Fleiri staðsetingar vórðu umrøddar, men vísti felagið á staðsetingina fyri endan á vøllinum, niðan móti skúlanum við Løgmannabreyt, sum bestu staðseting, sí kort sum sýnir økið, j.nr. 23/05602-6.

Fleiri grundgevingar eru fyri, hví júst henda staðsetingin er góð, og serliga varð víst á, at hetta lendið treingir til at verða bøtt, tí at tað er bratt, og grót rapar niður – so statt er verandi støða ikki trygg. Umsitingin tekur undir við, at økið eigur at verða gjørt, og tískil hevði henda staðsetingin gagnað økinum væl.

Somuleiðis varð prátað um, at henda staðsetingin fyri endan á vøllinum hevði gjørt atkomuna til vøllin og økið í síni heild betri skipað umvegis parkeringsøkið hjá Skúlanum.

Skúlin varðar av økinum, har parkeringsplássini eru, og við hesi staðseting, verða tað nøkur parkeringspláss, sum verða burturbeind. FC Hoyvík hevur verið á fundi við skúlan og frítíðarskúlan, og taka báðir partar undir við ætlaðu staðsetingini – hetta er skrivliga váttað.

<u>Meiri enn eitt felagshús til FC Hoyvík</u>:
FC Hoyvík vísir somuleiðis á, at tey ynskja, at felagshúsið umframt at vera til virksemið kring fótbóltin kann gerast eitt býlingshús til grannalagið – og harvið savna grannalagið til annað enn fótbólt.

Møguliga kann hugsast at húsið somuleiðis kann brúkast til skúla- og frítíðarskúlavirksemi.
<u>Heildarætlan fyri økið</u>:
Á fundinum við FC Hoyvík varð somuleiðis víst á, at har verandi lonir standa, eigur at verða gjørt møguligt at hava nakrar smærri fótbóltsvøllir.

Eisini varð víst á ynski um at gera økið út móti Karlamagnussarbreyt í sunnara enda til eitt spæliøki – sum kemur øllum borgarum til gagns.

Á vestaru síðuni meintu fundarluttakararnir, at man eigur at gera áskoðaramøguleikar.

Neyðugt er við eini samlaðari heildarætlan fyri økið, og eigur henda at verða gjørd sum skjótast. Tað skal tó ikki skiljast soleiðis, at manglandi heildarætlanin fyri økið skal steðga bygging av felagshúsi til felagið.

<u>Byggingin</u>:
Av tí at umstøðurnar hjá felagnum ikki eru nøktandi, og limatalið veksur heilt skjótt, er ynskiligt, at felagshúsið verður sett á breddan sum skjótast.

FC Hoyvík ynskir, at tað verður kommunan, sum kemur at standa fyri byggingini.

Felagið vísti á nakrar byrjanarskitsur av felagshúsinum, har innrættingin er víst. Sí viðhefta skjal, j.nr. 23/05602-4.

Fyri at fáa arbeiðið sett í gongd sum skjótast, so er upplagt at seta gongd á prosjekteringina av húsinum og lendisviðurskiftunum. Og tískil verður neyðugt við eini játtan til at seta prosjekteringina í gongd.

## Játtan:

Vanlig játtan ☒
Eyka játtan ☐
Lokað verkætlan ☐

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Deild | Verk-ætlan | Navn | Deild | Verk-ætlan | Navn | Nýggj verkætlan | Upphædd |
| 5775 | L57043 | Nýggj ljósskipan á Tórsvølli | 5775 | | | FC Hoyvík - Felagshús | 250.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | 250.000 |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | 2024 |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, tekniski stjórin, mentamálaleiðarin og býararkitekturin mæla til:
- at staðseta eitt komandi felagshús hjá FC Hoyvík fyri endan á vøllinum, eins og skjal nr. 23/05602-4 vísir.
- at arbeitt verður víðari við planleggingini av økinum, og at prosjekteringin av felagshúsinum verður boðin út og sett í verk
- at játtaðar verða kr. 250.000 av kt 5775, L57043, Nýggj ljósskipan á Tórsvølli á nýggja verkætlan undir kt 5775 við heitinum FC Hoyvík - Felagshús
- at málið verður beint í býráðið umvegis mentamálanevndina

**Byggi- og býarskipanarnevndin 17. juni 2024**: Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Mentamálanevndin 20. juni 2024**: Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini við teirri broyting, at játtaðar verða kr. 400.000 av kt. 5775, L57043, Nýggj ljósskipan á Tórsvølli á nýgja verkætlan undir kt 5775 við heitinum FC Hoyvík – Felagshús.

Málið beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 20. juni 2024**: Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

Tróndur Sigurðsson luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 20. juni 2024**: Einmælt samtykt.

**Ískoyti 24. oktober 2024**
Sáttmáli er undirskrivaður við ráðgevandi fyritøku um heildarætlan fyri stadionøkið og nýtt felagshús v.m.

Saman við ráðgevandi arkitektum, hevur umsitingin verið kring landið og hugt eftir, hvussu aðrar kommunur hava skipað felagshús við fótbóltsvallir. Hugt hevur serliga verið eftir teimum nýggjastu felagshúsunum í Føroyum.

Við hesum sum útgangsstøði og í teimum hugskotum sum FC Hoyvík hevur framlagt, verður framløga um hugskot til nýtt felagshús á komandi fundi í Mentamálanevndini.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamáleiðarin mæla til at mentamálanevndin tekur støðu til hvønn leist málið skal koyra víðari upp á, og at nýtt felagshús til FC Hoyvík kemur við í fíggjarætlanararbeiðið fyri komandi ár.

**Mentamálanevndin 30. oktober 2024**: Umrøtt.

**Ískoyti:**
Birgir Nielsen biður um at fáa málið fyri býráðið.

**Býráðsfundur 27. mars 2025:** Málið varð umrøtt, og síðani varð atkvøtt um, hvørt broytingaruppskot skuldi kunna leggjast fram í málinum, og fall hetta við fimm atkvøðum fyri, átta atkvøðum ímóti og ongari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Sunnvá Dahl Høgfeldt, Tróndur Sigurðsson, Kári Johansen, Høgni Vilhelmsen, Birgir Nielsen.

Ímóti atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Kristianna Winther Poulsen, Bergur Robert Dam Jensen, Guttormur í Skála.

Málið avgreitt við umrøðuni í býráðnum.

**FUNDURIN LOKIN KL. 21:40**

**GERÐABÓKIN GÓÐKEND:**

| | | |
|---|---|---|
| Elsa Berg | Heðin Mortensen | Heidi Lava Elgeirsdóttir |
| Annita á Fríðriksmørk | Anja Weyhe | Kristianna Winther Poulsen |
| Bergur Robert Dam Jensen | Guttormur í Skála | Tróndur Sigurðsson |
| Kári Johansen | Høgni Vilhelmsen | Birgir Nielsen |
| | Sunnvá Dahl Høgfeldt | |